Løgmálaráðið

Dagfesting:	20. september 2023
Mál nr.:	21/15422
Málsviðgjørt:	GMN
Ummælistíð:	8. juni – 17. juli
Eftirkannað:	29. august 2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om Straffeloven (Revsilógin)
(Innleiðandi ásetingar, vanligar treytir fyri at nýta revsirættarligar ásetingar, treytir fyri revsingarbæri, brotsroynd og viðvirkan, revsiábyrgd fyri løgfrøðiligar persónar, revsingarnar, treytað fongsulsrevsing, samfelagstænasta, aðrar rættarfylgjur av teirri revsiverdu gerðini, at áseta revsing og uppathald av rættarfylgjum av teirri revsiverdu gerðini)

§ 1

Í revsilógini, sambært lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við lov nr. 740 frá 13. juni 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg um revsing**"

2. Heitið á Parti I "*Almindelig Del.*" verður strikað og í staðin verður sett:

"**Partur I**
Almennur partur"

3. Kapittul 1 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 1**
Innleiðandi ásetingar

§ 1. Revsing kann bert verða áløgd fyri eina gerð, hvørs revsingarbæri er heimilað við lóg, ella sum fult og heilt kann javnsetast við eina slíka. Samsvarandi regla er galdandi fyri tær rættarfylgjur, sum nevndar eru í kapitli 9.
Stk. 2. Gerð sambært stk. 1 fevnir eisini um undanlát, uttan so at tað øvuta greidliga verður sagt ella skilst av samanhanginum.

§ 2. Kapitlarnir 1-11 í hesi løgtingslóg eru galdandi fyri øll revsiverd viðurskifti, um ikki annað er ásett.”

4. Kapittul 2 verður orðaður soleiðis:

“**Kapittul 2**
Vanligar treytir fyri at nýta revsirættarligar ásetingar

§ 3. Verður revsilóggáva broytt, eftir at gerðin er framd, men áðrenn avgerðin fyri hana fellur, verður spurningurin um revsing og revsingarbæri avgjørdur eftir teirri nýggju lógini, tó at avgerðin harvið ikki má vera harðari enn eftir teirri gomlu. Er lógin sett úr gildi av uttanífrá komandi orsøkum, sum eru óviðkomandi fyri revsiábyrgdina, skal gerðin metast eftir gomlu lógini.
Stk. 2. Um revsingarbærið fyri eina gerð dettur burtur við lóg á annan hátt enn soleiðis, sum nevnt er í stk. 1, 2. pkt., dettur eisini burtur tann fyri gerðina ídømda, men ikki fullgjørda revsingin. Tann dømdi kann krevja, at átaluvaldið leggur spurningin um, hvørt revsingin skal fella burtur, fyri tann rættin, sum dømdi í málinum fyrstu ferð. Avgerðin verður tikin við úrskurði.

§ 4. Hvørt tann revsiverda gerðin skal hava við sær tær rættarfylgjur, sum eru nevndar í §§ 56-61, 62-70, 73 og 79, verður avgjørt eftir teirri lóg, sum er galdandi, tá ið avgerðin fellur.
Stk. 2. Um ikki annað er ásett, kunnu aðrar rættarfylgjur av gerðini bert koma upp á tal, um heimild eisini var fyri tí í teirri lóggávu, sum var galdandi, tá ið gerðin varð framd.
Stk. 3. Ásetingin í § 3, stk. 2, er somuleiðis galdandi fyri aðrar rættarfylgjur av gerðini enn revsing, um tær vóru treytaðar av, at gerðin var revsingarbær.

§ 5. Tá ið herd revsing ella aðrar rættarfylgjur eru fyriskrivaðar í endurtøkuførum, verða avgerðir, sum eru tiknar eftir áður galdandi rætti, eftir sínum innihaldi tiknar við eins og avgerðir eftir teirri lóg, sum tann aktuella gerðin verður dømd eftir.

§ 6. Revsimyndugleikin fevnir um gerðir, ið verða framdar:
1) í tí øki, sum tann til eina og hvørja tíð galdandi heimarættur í Føroyum fevnir um,
2) á fari, sum er skrásett í hesum øki, og sum er á øki hjá fremmandum myndugleika, av persóni, sum er knýttur at ella sum er ferðandi við farinum, ella
3) á fari skrásett í hesum øki, sum er uttan fyri eitt myndugleikaøki.

§ 7. Revsimyndugleikin fevnir um gerðir, ið verða framdar á øki hjá fremmandum myndugleika, av einum persóni, sum í skuldsetingarløtuni hevur tann í § 6 nevnda heimarætt, hevur bústað í tí í § 6 nevnda øki ella hevur líknandi fast uppihald í hesum øki, um:
1) gerðin eisini er revsiverd sambært lógini á gerningsstaðnum, tað er tvífalt revsingarbæri, ella
2) gerningsmaðurin eisini í gerningsløtuni hevur nevnda tilknýtið til økið, og gerðin:
   a) fevnir um kynsliga misnýtslu av børnum, menniskjahandil ella kvinnuliga umskering, ella
   b) verður gjørd ímóti onkrum, sum í gerningsløtuni hevur nevnda tilknýtið til økið.

Stk. 2. Revsimyndugleikin fevnir eisini um gerðir, ið verða framdar uttan fyri eitt myndugleikaøki av einum persóni, sum í skuldsetingarløtuni hevur eitt tílíkt tilknýti til øki, sum lýst í stk. 1, um slíkar gerðir kunnu hava við sær harðari revsing enn 4 mánaða fongsul.
Stk. 3. Stk. 1, nr. 1, og stk. 2 eru eisini galdandi fyri gerðir, ið verða framdar

av einum persóni, sum í skuldsetingarløtuni hevur heimarætt ella er búsitandi í Finnlandi, Íslandi, Noregi ella Svøríki, og sum er staddur í tí í stk. 1 nevnda øki.

§ 7 a. Revsimyndugleikin fevnir um gerðir, ið verða framdar á øki hjá fremmandum myndugleika, og sum eru vendar ímóti persóni, sum í gerningsløtuni hevur tann í § 6 nevnda heimarætt og hevur bústað í tí øki, sum nevnt í § 6, ella hevur líknandi fast uppihald í hesum øki, um so er, at gerðin eisini er revsiverd sambært lóggávuni á gerningsstaðnum, tað er tvífalt revsingarbæri, og sambært føroyskari lóggávu kann geva revsing við fongsli í minst 6 ár.
Stk. 2. Revsing sambært stk. 1 er treytað av, at gerðin fevnir um:
1) tilætlað dráp,
2) grovan harðskap, frælsistøku ella rán,
3) alvandasom brotsverk,
4) kynsligt brotsverk ella blóðskemd, ella
5) kvinnuliga umskering.

Stk. 3. Føroyskur revsimyndugleiki fevnir eisini um gerðir, ið verða framdar uttan fyri eitt myndugleikaøki, og sum eru vendar ímóti persóni, sum í gerningsløtuni hevur eitt tílíkt tilknýti til økið, sum lýst er í stk. 1, um slíkar gerðir kunnu geva harðari revsing enn 4 mánaða fongsul.

§ 7 b. Tá ið revsimyndugleikin mótvegis einum løgfrøðiligum persóni er treytaður av tvífaldum revsingarbæri, er tað ikki neyðugt, at lóggávan á gerningsstaðnum heimilar revsiábyrgd fyri ein løgfrøðiligan persón.

§ 8. Revsimyndugleikin fevnir um gerðir, ið verða framdar uttan fyri tað í § 6 nevnda øki uttan mun til, hvar gerningsmaðurin eigur heima, tá ið:

1) gerðin skerjir sjálvræði, trygd, stýrisskipan ella almennar myndugleikar í tí í § 6 nevnda øki, herundir sjálvsavgerðarrætt og stýrisskipan Føroya, ella eina embætisskyldu móti tí lóggevandi, útinnandi ella dømandi valdi í tí í § 6 nevnda øki,
2) gerðin skerjir áhugamál, hvørs rættarvernd í tí í § 6 nevnda øki treytar eitt serligt tilknýti til hetta,
3) gerðin skerjir eina skyldu, sum tað sambært lóg er álagt gerningsmanninum at halda í útlondum,
4) gerðin skerjir eina tænastuskyldu, sum áliggur gerningsmanninum mótvegis fari, sum er skrásett í tí í § 6 nevnda øki,
5) gerðin er fevnd av millumtjóða áseting, sum áleggur tað í § 6 nevnda økið at kunna revsa, ella
6) sýtt verður fyri at útflýggja skuldsettan til rættarsókn í øðrum landi, og gerðin, um hon er framd á fremmandum myndugleikaøki, er revsiverd sambært lóggávuni á gerningsstaðnum, tað er tvífalt revsingarbæri, og gerðin sambært føroyskari lóggávu kann geva fongsul í minst 1 ár.

§ 8 a. Revsimyndugleikin fevnir um gerðir, ið verða framdar uttan fyri tað í § 6 nevnda økið, tá ið tær eru av slíkum slag, at tær koma undir reglugerðina hjá Millumtjóða revsidómstólinum, og tær verða framdar av einum persóni, sum í skuldsetingarløtuni:
1) hevur tann í § 6 nevnda heimarætt, hevur bústað í tí í § 6 nevnda øki ella líknandi fast uppihald í økinum, ella
2) er staddur í økinum.

§ 8 b. Revsimyndugleikin fevnir um gerðir, ið verða framdar uttan fyri tað í § 6 nevnda øki, tá ið tær koma undir §

183 a og verða framdar av einum persóni, sum í skuldsetingarløtuni:
1) hevur tann í § 6 nevnda heimarætt, hevur bústað í tí í § 6 nevnda øki ella líknandi fast uppihald í økinum, ella
2) er staddur í økinum.

Stk. 2. Rættarsókn fyri gerðir eftir stk. 1 kann eisini fevna um brot á §§ 237 og 244-248, sum eru framd í sambandi við brot á § 183 a.

§ 9. Gerðir verða roknaðar sum framdar, har sum gerningsmaðurin var, tá ið gerðin varð framd. Fyri løgfrøðiligar persónar verða gerðir roknaðar sum framdar, har sum tann ella tær gerðir, sum hava við sær ábyrgd hjá tí løgfrøðiliga persóninum, eru framdar.

Stk. 2. Um revsingarbærið fyri eina gerð er treytað av ella verður ávirkað av eini fylgju, sum er hend ella ætlað, verður gerðin eisini at rokna sum framd, har sum virknaðurin er, ella har gerningsmaðurin hevði tilætlan um, at virknaðurin skuldi verða.

Stk. 3. Brotsroyndir og viðvirkan verða roknaðar sum framdar í tí í § 6 nevnda øki, um gerningsmaðurin var í økinum, tá ið gerðin varð framd, sama um lógarbrotið verður fullgjørt ella er ætlað at verða fullgjørt uttan fyri økið.

Stk. 4. Tá ið partur av lógarbroti er framdur í tí í § 6 nevnda øki, er lógarbrotið í síni heild at rokna sum framt í økinum.

§ 9 a. Eitt lógarbrot, sum viðvíkur teksttilfari, ljóðtilfari ella myndatilfari o.ø., sum í útlondum er gjørt alment atkomuligt í tí í § 6 nevnda øki ígjøgnum internetið ella tílíka skipan til at breiða út upplýsingar, verður roknað sum framt í økinum, um tilfarið hevur serligt samband við økið.

§ 10. Við rættarsókn í Føroyum skal avgerðin um bæði revsing og aðrar rættarfylgjur verða tikin eftir føroyskari lóggávu.

Stk. 2. Tá ið revsing er treytað av tvífaldum revsingarbæri, kann ikki verða dømd harðari revsing, enn heimilað í lóggávuni á gerningsstaðnum.

§ 10 a. Ein persónur, sum hevur fingið revsidóm uttan fyri tað í § 6 nevnda økið, kann ikki verða rættarsøktur í Føroyum fyri somu gerð, tá ið hetta er útilokað sambært millumtjóða skyldum um at viðurkenna rættargildið av revsidómum.

Stk. 2. Í øðrum førum kann persónur, sum hevur fingið revsidóm uttan fyri tað í § 6 nevnda økið, ikki verða rættarsøktur í Føroyum fyri somu gerð, um:
1) persónurin er endaliga fríkendur,
2) revsiatgerðin er fullgjørd, er undir fullgerð ella er burturdottin sambært lóggávuni í dómslandinum, ella
3) persónurin er funnin sekur, uttan at revsiatgerð er ásett.

Stk. 3. Stk. 2 er ikki galdandi, tá ið:
1) útlendski revsidómurin viðvíkur gerðum, sum:
   a) eru at rokna sum framdar í tí í § 6 nevnda øki sambært § 9 ella § 9 a, ella
   b) eru fevndar av § 7, stk. 1, nr. 2, ella § 8, nr. 1 ella 2,
2) rættarsóknin fer fram í Føroyum sambært § 1010 í rættargangslógini, ella
3) viðurkenning av útlendska revsidóminum eyðsýniliga ikki er sambærilig við føroyskar rættargrundreglur.

Stk. 4. Í teimum førum, sum eru nevnd í stk. 3, nr. 1, kann rættarsókn ikki fara fram í Føroyum, um rættarsókn í dómslandinum er framd eftir áheitan frá ákæruvaldinum í tí í § 6 nevnda økinum.

§ 10 b. Verður persónur rættarsøktur, sum uttan fyri tað í § 6 nevnda økið hevur fingið revsiatgerð fyri somu gerð, skal revsiatgerðin, sum verður givin í Føroyum, verða lækkað í mun til, hvussu stórur partur av útlendsku revsiatgerðini er fullgjørdur.

§ 11. Er ein persónur, sum hevur tann í § 6 nevnda heimarætt, hevur bústað í tí í § 6 nevnda øki ella líknandi fast uppihald í hesum, revsaður í einum fremmandum landi fyri eina gerð, sum sambært føroyskari lóggávu kann hava við sær frádøming ella miss av kalli ella vinnu ella øðrum rættindum, kann slík frádøming henda eftir almennari átalu her á landi.

§ 12. Viðurkend undantøk í fólkarættinum kunnu hava við sær avmarking í §§ 6-11."

5. Kapittul 3 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 3**
Treytir fyri revsingarbæri

§ 13. Gerðir, sum eru framdar í neyðverju, eru revsifríar, um tær vóru neyðugar fyri at standa ímóti ella forða fyri einum av órøttum byrjaðum ella hóttandi álopi, og tær eyðsýniliga ikki fara út um tað, sum er ráðiligt í mun til, hvussu vandamikið álopið er, hvør tað er, sum loypur á, og týdningin á tí álopna rættargóðanum.
Stk. 2. Fer nakar út um mark fyri lógliga neyðverju, verður hann tó revsifríur, um tað er rímiliga grundað út frá teirri ræðslu ella øsing, ið álopið hevði við sær.
Stk. 3. Somu reglur eru galdandi fyri gerðir, sum eru neyðugar fyri á lógligan hátt at síggja til, at lóglig boð verða fylgd, at lógligar handtøkur kunnu fara fram ella forða fyri, at fangar ella tvingsilssettir persónar taka til rýmingar.

§ 14. Ein gerð, sum annars hevði verið revsiverd, verður ikki revsað, um hon var neyðug til tess at forða fyri hóttandi skaða á persón ella góðs, og lógarbrotið verður mett at hava lutfalsliga lítið uppá seg.

§ 15. Gerðir, framdar av børnum undir 15 ár, verða ikki revsaðar.

§ 16. Persónar, sum í gerningsløtuni vóru ósaknæmir orsakað av sinnissjúku ella eini støðu, sum kann javnmetast við sinnissjúku, verða ikki revsaðir. Sama er galdandi fyri persónar við munandi menningartarni. Var gerningsmaðurin orsakað av rúsdrekka ella øðrum rúsevni fyribils sinnissjúkur ella í eini støðu, sum kann javnmetast við sinnissjúku, kann revsing tó vera áløgd, um serligar umstøður tala fyri tí.
Stk. 2. Persónar, sum í gerningsløtuni vóru menningartarnaðir í minni mun, verða ikki revsaðir, um ikki serligar umstøður tala fyri tí. Sama er galdandi fyri persónar, sum vóru í einari støðu, sum fult og heilt kann javnmetast við menningartarn.

§§ 17-18. (Strikaðar).

§ 19. Ósketni verður bert revsað fyri lógarbrot sambært hesi løgtingslóg, tá hetta er serliga heimilað. Fyri onnur lógarbrot kunnu viðkomandi revsireglur nýtast, eisini tá ið lógarbrotið er gjørt av ósketni, um ikki tað øvuta er serliga heimilað.

§ 20. Har ið revsing ella herd revsing eru treytaðar av, at eitt tilætlað lógarbrot hevur eina ávísa ótilætlaða fylgju, verður henda revsing bert givin, um slík fylgja kann ábyrgjast ósketni hjá gerningsmanninum, ella at hann hevur latið vera við eftir førimuni at forða fyri fylgjuni, eftir at hann er vorðin varur við vandan."

6. Kapittul 4 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 4**
Brotsroynd og viðvirkan

§ 21. Gerðir, sum miða eftir at fremja ella elva til útinningina av einum brotsverki, verða, tá ið brotsverkið ikki verður fullført, revsaðar sum brotsroyndir.
Stk. 2. Ásetta revsingin fyri lógarbrotið kann minka, tá ið talan er um brotsroynd, serliga um brotsroyndin ber brá av vantandi styrki ella treysti í brotsligu tilætlanini.
Stk. 3. Er ikki annað ásett, verður brotsroynd bert revsað, um tað fyri lógarbrotið kann dømast ein revsing, sum er meira enn 4 mánaða fongsul.

§ 22. Brotsroynd verður ikki revsað, tá ið gerningsmaðurin sjálvboðin og ikki orsakað av tilvildarligum forðingum fyri at útinna gerðina ella fyri at røkka tí við gerðini ætlaða endamálinum:
1) letur vera við at fremja gerðina,
2) forðar fyri fullgerðini, ella
3) fremur gerðir, sum vildu havt forðað fyri fullgerðingini, um hon ikki, honum ókunnugt, var miseydnað ella á annan hátt forðað.

§ 23. Revsiásetingin fyri eitt lógarbrot fevnir um øll, sum við tileggjan, ráði ella verki hava viðvirkað til gerðina. Revsingin kann minka fyri tann, sum bert hevur viljað givið minni týðandi hjálp ella styrkt um eina longu verandi tilætlan. Revsingin kann eisini minka, tá ið brotsverkið ikki er fullgjørt, ella tá ið ein ætlað viðvirkan er miseydnað.
Stk. 2. Revsingin kann eisini minka fyri tann, sum viðvirkar til brot á samband við serligum skyldum, men sjálvur stendur uttan fyri hetta.
Stk. 3. Um ikki annað er ásett, kann revsing fyri viðvirkan til lógarbrot, sum ikki hava við sær harðari revsing enn 4 mánaða fongsul, detta burtur, um tann viðvirkandi bert hevur viljað givið minni týðandi hjálp ella styrkt um eina longu verandi tilætlan, og um viðvirkan hansara kemst av ósketni.

§ 24. Tann viðvirkandi verður ikki revsaður, um hann sambært teimum treytum, ið eru nevndar í § 22, forðar fyri fullgerðini ella fremur gerðir, sum vildu havt forðað fyri fullgerðini, um hon ikki, honum ókunnugt, var miseydnað ella á annan hátt forðað."

7. Kapittul 5 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 5**
Revsiábyrgd fyri løgfrøðiligar persónar

§ 25. Ein løgfrøðiligur persónur kann verða revsaður við sekt, tá ið tað er ásett við lóg ella við heimild í lóg.

§ 26. Um ikki annað er ásett, fevna ásetingarnar um revsiábyrgd hjá feløgum o.ø. um ein og hvønn løgfrøðiligan persón, herímillum partafeløg, smápartafeløg, lutafeløg, íognarfeløg, feløg, grunnar, búgv, kommunur, landsmyndugleikar og ríkismyndugleikar.
Stk. 2. Harumframt fevna slíkar ásetingar eisini um einstaklingsfyritøkur, um tær serliga í stødd og bygnaði kunnu javnsetast við feløg, sum eru nevnd í stk. 1.

§ 27. Revsiábyrgd hjá løgfrøðiligum persóni er treytað av, at tað innan fyri virksemi hansara er framt eitt brot, sum kann ábyrgjast einum ella fleiri persónum, sum hava tilknýti til tann løgfrøðiliga persónin, ella tí løgfrøðiliga persóninum í sjálvum sær. Fyri revsing fyri brotsroyndir verður § 21, stk. 3, at nýta á sama hátt.
Stk. 2. Landsmyndugleikar, ríkismyndugleikar og kommunur kunnu bert revsast fyri brot, sum verða gjørd í sambandi við virksemi, sum svarar til ella kann javnsetast við virksemi hjá privatum.

§§ 28-30. (Strikaðar).”

8. Kapittul 6 verður orðaður soleiðis:

“**Kapittul 6**
Revsingarnar

§ 31. Vanligu revsingarnar eru fongsul og sekt.

§ 32. (Strikað).

§ 33. Fongsul verður dømt upp á lívstíð ella tíð, sum ikki er undir 7 dagar og ikki yvir 16 ár.
Stk. 2. Í førum, har tað er heimild til at herða ta revsing, sum er ásett fyri eitt lógarbrot, kann tað kortini verða dømt fongsul upp til 20 ár.
Stk. 3. Gerningsmaður, sum ikki var fyltur 18 ár, tá ið gerðin varð framd, kann ikki verða dømdur í fongsul upp á lívstíð.
Stk. 4. Fongsulsrevsing styttri enn 3 mánaðir verður ásett í døgum, annars í mánaðum og árum.

§§ 34-39. (Strikaðar).

§ 40. Fremur ein, sum er royndarleyslatin, nýggj revsiverd viðurskifti í royndartíðini, og verða rættargangsstig tikin, áðrenn royndartíðin er úti, har tann royndarleyslatni verður skuldsettur fyri hesi viðurskifti, tekur rætturin avgerð í samsvari við § 61, stk. 2, soleiðis at írestandi revsingin verður javnsett við treytaðan dóm. Hevur royndarleyslating, sambært § 79 d, stk. 3 ella 4 í lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf m.v., havt við sær fylgistreytir um samfelagstænastu, skal við ásetingini av felagsrevsingini havast fyrilit fyri vavinum av útintu samfelagstænastuni.

§§ 40 a-41. (Strikaðar).

§ 42. Fremur ein persónur, sum er royndarleyslatin frá at sita lívstíðarrevsing sambært § 79 e í lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf m.v., nýggj revsiverd viðurskifti í royndartíðini, kann rætturin við dómi gera av, at viðkomandi skal inn aftur at sita lívstíðarrevsingina. Rættargangsstig skulu tó verða tikin, áðrenn royndartíðin er úti, har tann royndarleyslatni verður skuldsettur fyri hesi viðurskifti.
Stk. 2. Tá ið umstøðurnar tala fyri tí, kann rætturin í staðin bert døma revsing fyri nýggja lógarbrotið, møguliga saman við eini broyting av fylgistreytunum fyri royndarleyslatingini.

§ 43. (Strikað).

§ 44. Løgmálaráðharrin kann áseta reglur um møguleikan at kæra avgerðir, sum eru tiknar sambært §§ 40 og 42, herímillum um, at avgerðirnar ikki kunnu verða lagdar fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika. Løgmálaráðharrin kann í hesum sambandi áseta reglur um kærufreistir, viðgerð av kærumálum og um steðgandi virknað av kærum.

§§ 45-49. (Strikaðar).

§ 50. Sektir fella til ríkiskassan.
Stk. 2. Sekt kann verða dømd sum ískoytisrevsing til annað revsingarslag, tá ið tann ákærdi við lógarbrotinum hevur fingið ella hevur miðað eftir at fingið fíggjarligan vinning til sín sjálvs ella onnur.
Stk. 3. Tann sektaði kann ikki krevja, at sektin verður goldin ella endurgoldin av øðrum.

§ 51. Tá ið sekt sambært hesi løgtingslóg verður dømd, ella tikið verður við sekt í rættinum, verður sektarrevsing ásett í dagsektum. Hetta er tó ikki galdandi fyri sekt, sum

verður ásett sum ískoytisrevsing til aðra rættarfylgju.
Stk. 2. Talið á dagsektum verður við atliti at slagnum á lógarbrotinum og at teimum í § 80 nevndu umstøðum ásett til í minsta lagi 1 og í mesta lagi 60 dagsektir.
Stk. 3. Dagsektin verður ásett til eina upphædd, sum svarar til miðal dagsinntøkuna hjá tí sektaða, tó at tað í hesum sambandi eigur at vera havt fyrilit fyri lívsumstøðum sektaða, herímillum ogn hansara, uppihaldsskyldum og øðrum viðurskiftum, sum ávirka gjaldførleikan. Dagsektin kann tó ikki ásetast til eina minni upphædd enn 2 kr.
Stk. 4. Tá ið sekt skal verða ásett fyri brot, har viðkomandi hevur fingið ella hevur miðað eftir at fingið munandi fíggjarligan vinning til sín sjálvs ella onnur, og nýtslan av dagsekt hevur við sær, at sektarupphæddin verður ásett lægri enn tað, sum verður hildið at vera rímiligt í mun til støddina á vinninginum, sum antin er fingin ella kundi verið fingin við lógarbrotinum, kann rætturin tó í staðin fyri dagsekt nýta aðra sektarrevsing.
Stk. 5. Tá ið onnur sektarrevsing verður ásett, skal innan fyri tey mørk, sum atlitið at slagnum á lógarbrotinum og at teimum í § 80 nevndu umstøðum loyvir, serliga havast fyrilit fyri gjaldførleikanum hjá tí seka og tann vinning ella ta sparing, sum er fingin ella kundi havt verið fingin.
Stk. 6. Løgreglan kann hjá øðrum almennum myndugleikum útvega upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at áseta sektarupphæddina. Frá skráum, sum almennir myndugleikar halda, herímillum skráum hjá dómstólum, kann løgreglan eisini krevja upplýsingar um viðurskifti hjá viðkomandi, sum verða hildin at hava týdning fyri áseting av sektini. Upplýsingarnar verða latnar skrivliga ella við beinleiðis dátuflutningi.

§ 52. (Strikað).

§ 53. Verður sekt ikki goldin, verður í staðin nýtt umskiftisrevsing við fongsli.

§ 54. Tá ið sekt verður dømd, ella tikið verður við sekt í rættinum, avger rætturin samstundis, sum hann ásetir sektina, longdina á umskiftisrevsingini. Er sektin ásett sum dagsekt, skal í útrokningini av umskiftisrevsingini ansast eftir, at 1 dags fongsul svarar til 1 dagsekt, tó at umskiftisrevsing kann ikki vera minni enn 2 dagar. Er sektin ásett á annan hátt, kann umskiftisrevsingin ikki vera minni enn 2 dagar og ikki longri enn 60 dagar. Í serligum førum kann umskiftisrevsingin tó hækka upp til 9 mánaðir.
Stk. 2. Er partur av sektini goldin, verður umskiftisrevsingin minkað lutfalsliga, tó soleiðis, at partur av degi verður at rokna sum heilur dagur, og at umskiftisrevsingin ikki kann minkast meira enn omanfyri nevndu minstutíð. Er partur av sektini sitin, og restin er í boði at verða goldin, verður í útrokningini av hesi rest einans taldir við teir heilu dagar, sum umskiftisrevsingin er sitin.
Stk. 3. Tá løgfrøðiligir persónar verða dømdir sekt, verður eingin umskiftisrevsing ásett.

§ 55. Sektir upp á 10.000 kr. ella minni, sum tikið er við eftir fráboðan frá løgregluni, verða at sita soleiðis:
1) Sekt millum 0 og 499 kr. verður at sita 2 dagar.
2) Sekt millum 500 og 999 kr. verður at sita 4 dagar.
3) Sekt millum 1.000 og 3.999 kr. verður at sita 6 dagar.
4) Sekt millum 4.000 og 5.999 kr. verður at sita 8 dagar.
5) Sekt millum 6.000 og 10.000 kr. verður at sita 10 dagar

Stk. 2. Fyri aðra sekt, sum ikki er dømd ella tikið er við í rættinum, verður umskiftisrevsingin ásett av Føroya Rætti.
Stk. 3. Ásetingarnar í § 54, stk. 1, fjórða punktum, og stk. 2, eru somuleiðis galdandi."

9. Kapittul 7 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 7**
Treytað fongsulsrevsing

§ 56. Heldur rætturin, at ikki er neyðugt at fullgera fongsulsrevsing, verður ásett í dóminum, at fullgerðin verður útsett og dettur burtur, tá ið royndartíðin er úti.
Stk. 2. Útsetingin er treytað av, at tann dømdi ikki fremur revsiverd viðurskifti í royndartíðini, og at hann heldur tær fylgistreytir, sum eru givnar sambært § 57. Rætturin ásetir royndartíðina, sum vanliga ikki kann vera meira enn 3 ár. Undir serligum umstøðum kann tó verða ásett ein royndartíð í upp til 5 ár.

§ 57. Rætturin kann sum fylgistreyt fyri útsetingini áseta, at tann dømdi skal vera undir umsjón alla royndartíðina ella ein part av henni. Harumframt kann rætturin áseta aðrar fylgistreytir, sum verða hildnar at vera gagnligar, herímillum at tann dømdi:

1) Heldur serligar ásetingar um uppihaldsstað, arbeiði, útbúgving, frítíðarnýtslu ella samveru við ávísar persónar.
2) Er í egnaðum heimi ella stovni; fyri slíkt uppihald verður í dóminum ásett ein mestatíð, sum vanliga ikki kann vera meira enn 1 ár.
3) Heldur seg frá at misnýta rúsdrekka, rúsevni ella líknandi heilivág.
4) Gevur seg undir avvenjingarviðgerð fyri misnýtslu av rúsdrekka, rúsevni ella líknandi heilivági, um neyðugt á sjúkrahúsi ella á serligum stovni.
5) Gevur seg undir skipaða rúsdrekkaviðgerð, sum er undir eftirliti, og sum varir í minst 1 ár.
6) Gevur seg undir psykiatriska viðgerð, um neyðugt á sjúkrahúsi.
7) Ger eftir ásetingum hjá umsjónarmyndugleikanum um avmarkað ræði á inntøku og ogn og um at lúka fíggjarligar skyldur.
8) Rindar endurgjald fyri tap, sum lógarbrotið hevur elvt til.
9) Eftir avgerð hjá barnaverndarnevndini gevur seg undir fyriskipanir sambært § 15 í løgtingslóg um barnavernd, møguliga av neyvari ásettum slag, og ger eftir teimum reglum, sum barnaverndarnevndin upplýsir fyri viðkomandi.

§ 58. Verður treytaleys fongsulsrevsing hildin at vera neyðug, men tala upplýsingarnar um persónligu viðurskiftini hjá tí ákærda fyri treytaðum dómi sambært § 56, kann rætturin áseta, at ein partur av skyldugu revsingini, tó í mesta lagi 6 mánaðir, skal fullgerast, meðan dómurin aðramáta verður treytaður.
Stk. 2. Í sambandi við treytaðan dóm kann sekt verða dømd, hóast heimild ikki er fyri slíkari revsing fyri viðkomandi lógarbrot.

§ 59. Tær fylgistreytir, sum ásettar eru sambært § 57, kunnu seinni verða broyttar ella settar úr gildi við rættarúrskurði eftir áheitan frá ákæruvaldinum ella tí dømda. Áheitan frá tí dømda verður sett fram fyri ákæruvaldinum, ið sum skjótast leggur málið fyri rættin. Verður áheitanin frá tí dømda ikki
eftirlíkað, kann hann ikki seta nýggja áheitan fram fyrr enn hálvt ár eftir, at úrskurðurin er sagdur.
Stk. 2. Spurningarnir, sum eru nevndir í stk. 1, verða lagdir fyri Føroya Rætt.

§ 60. Brýtur tann dømdi fylgistreytir, sum eru ásettar sambært § 57, kann rætturin í tí sambandi:

1) Geva ávaring.
2) Við úrskurði broyta fylgistreytirnar og leingja um royndartíðina innan fyri ta mestutíð, sum ásett er í § 56, stk. 2.
3) Við dómi taka avgerð um, at fongsulsrevsingin skal fullgerast. § 58, stk. 1, er somuleiðis galdandi.

Stk. 2. Fyri rættaravgerðir, sum eru nevndar í stk. 1, er § 59, stk. 2, somuleiðis galdandi.

§ 61. Verða, áðrenn royndartíðin er úti, tikin rættargangsstig móti tí dømda, har hann verður skuldsettur fyri revsiverd viðurskifti, sum eru framd áðrenn tann treytaða dómin, ásetir rætturin rættarfylgjuna fyri hendan tilburðin og tað áður dømda lógarbrotið.

Stk. 2. Fremur tann dømdi nýggj revsiverd viðurskifti í royndartíðini, og verða, áðrenn royndartíðin er úti, tikin rættargangsstig, har hann verður skuldsettur fyri tilburðin, ásetir rætturin treytaleysa revsing ella aðra rættarfylgju fyri hendan tilburðin og tað áður dømda lógarbrotið. Ásetingarnar í § 88, stk. 2-4, eru somuleiðis galdandi. Tá ið umstøðurnar tala fyri tí, kann rætturin í staðin:

1) døma treytaleysa revsing einans fyri nýggju tilburðirnar, møguliga saman við eini broyting av fylgistreytunum í treytaða dóminum, ella
2) siga nýggjan treytaðan dóm fyri bæði lógarbrotini ella bert fyri nýggja tilburðin í samsvari við reglurnar í hesum ella næsta kapitli.

§ 61 a. (Strikað)."

10. Kapittul 8 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 8**
Samfelagstænasta

§ 62. Verður treytaður dómur eftir reglunum í §§ 56 og 57 hildin at vera ónøktandi, kann rætturin, um tann ákærdi verður mettur at vera egnaður til tess, døma treytaðan dóm við fylgistreyt um samfelagstænastu.

Stk. 2. Avgerðin um at útseta fullgerðina av fongsulsrevsing verður tikin eftir reglunum í § 56, stk. 1.

Stk. 3. Útsetingin verður treytað av, at tann dømdi ikki fremur revsiverd viðurskifti í einari royndartíð, og at hann heldur tær fylgistreytir, sum eru settar sambært § 63.

§ 63. Sum fylgistreyt fyri at útseta fongsulsrevsing verður ásett, at tann dømdi skal gera ólønta samfelagstænastu í minsta lagi 30 og í mesta lagi 300 tímar. Samfelagstænastan skal verða útint innan fyri eina mestutíð, sum verður ásett í mun til tímatalið.

Stk. 2. Mestatíðin, sum er ásett sambært stk. 1, kann verða longd av umsjónarmyndugleikanum, um serligar orsakir tala fyri tí, tó ikki út yvir royndartíðina. Avgerðin hjá umsjónarmyndugleikanum um at leingja mestutíðina verður løgd fyri rættin eftir umbøn frá tí dømda.

Stk. 3. Í dóminum verður ásett royndartíð upp á í mesta lagi 2 ár. Er treytaða fongsulsrevsingin ásett at vera í mesta lagi 3 mánaðir, heldur royndartíðin uppat, tá ið mestatíðin at gera samfelagstænastu er runnin.

Stk. 4. Tann dømdi skal vera undir umsjón í royndartíðini. Rætturin kann harumframt, um tað verður hildið at vera gagnligt, áseta fylgistreytir, sum eru nevndar í § 57. Umsjónin endar, og møguligar fylgistreytir sambært § 57 detta burtur, tá ið mestatíðin at gera samfelagstænastu er runnin, um ikki annað er ásett í dóminum.

§ 64. Í sambandi við treytaðan dóm við fylgistreyt um samfelagstænastu kann verða dømd treytaleys fongsulsrevsing ella sekt eftir reglunum í § 58. Fongsulsrevsing ásett sambært § 58, stk. 1, kann tó ikki vera longri enn 3 mánaðir ella ein triðing av samlaðu fongsulsrevsingini.

§ 65. Ásetingarnar í § 59 um at broyta ella seta úr gildi fylgistreytir eru somuleiðis galdandi fyri tær ásetingar, sum eru gjørdar sambært § 63.

§ 66. Heldur tann dømdi ikki fylgistreyt um samfelagstænastu ella aðra fylgistreyt, kann rætturin:

1) taka avgerð um treytaleysa fongsulsrevsing fyri framda lógarbrotið, ella
2) áseta, at treytaði dómurin skal halda áfram, møguliga saman við eini leinging av mestutíðini fyri samfelagstænastu og av royndartíðini innan fyri tey mørk, sum eru ásett í § 63.

Stk. 2. Tá ið treytaleys revsing verður ásett eftir stk. 1, nr. 1, kann § 58, stk. 1, nýtast. Ein treytað partrevsing eftir hesi áseting kemur tá í staðin fyri dómin um samfelagstænastu, og til hesa kunnu leggjast fylgistreytir sambært § 63, stk. 4. Uttan mun til hesar ásetingar kann í sambandi við framhaldandi samfelagstænastu verða dømd treytaleys fongsulsrevsing upp til 3 mánaðir.

Stk. 3. Tá ið revsing verður ásett, skal fyrilit havast fyri vavinum av tí samfelagstænastu, tann dømdi hevur útint. Um tann dømda treytaða fongsulsrevsingin er ásett at vera longri enn 3 mánaðir, verður dømda samfelagstænastan mett at svara til tveir triðingar av treytaðu fongsulsrevsingini.

Stk. 4. Avgerðir um at fullgera útsetta revsing verða tiknar við dómi. Aðrar avgerðir verða tiknar við úrskurði. § 59, stk. 2, er somuleiðis galdandi.

§ 67. Reglurnar í § 61 eru somuleiðis galdandi í málum um persónar, sum eftir ein treytaðan dóm við fylgistreyt um samfelagstænastu verða skuldsettir fyri revsiverd viðurskifti, sum teir hava framt fyri ella eftir dómin.

Stk. 2. Verður treytaleys partrevsing dømd eftir § 58, stk. 1, ella eftir § 61, stk. 2, nr. 1, kemur fyri restina av revsingini ein treytaður dómur sambært kapitli 7 í staðin fyri dómin til samfelagstænastu. Uttan mun til ásetingarnar í 1. pkt. kann í sambandi við framhaldandi samfelagstænastu verða dømd treytaleys fongsulsrevsing upp til 3 mánaðir.

Stk. 3. § 66, stk. 3 er somuleiðis galdandi.”

11. Kapittul 9 verður orðaður soleiðis:

“**Kapittul 9**
Aðrar rættarfylgjur av teirri revsiverdu gerðini

§ 68. Verður ein ákærdur persónur fríkendur fyri revsing sambært § 16, kann rætturin taka avgerð um at nýta aðrar fyriskipanir, ið verða hildnar at vera gagnligar til at fyribyrgja fleiri lógarbrot.

Stk. 2. Um minni víðfevndar fyriskipanir sum umsjón, ásetingar um uppihaldsstað ella arbeiði, avvenjingarviðgerð, psykiatrisk viðgerð o.a. ikki verða hildnar at vera nøktandi, kann avgerð takast um, at viðkomandi skal verða settur á sjúkrahús fyri sálarsjúk, á stovn fyri persónar, ið bera víðfevnandi sálarlig brek, ella undir umsjón við møguleika fyri fyrisitingarligari seting ella á egnað heim ella egnaðan stovn til serliga røkt ella umsorgan.

Stk. 3. Seting í trygdarvarðhald kann gerast eftir teimum treytum, sum eru nevndar í § 70.

§ 68 a. Hevur fyriskipan eftir § 68 ella § 72, samanber við § 68, við sær, at tann dømdi skal setast í ein stovn, ella inniheldur fyriskipanin henda møguleika, verður ásett ein mestatíð upp á 5 ár fyri hesa fyriskipan. Mestatíðin fevnir eisini um fyriskipanir, sum verða ásettar seinni eftir § 72, samanber við § 68, og sum hava við sær linking av teirri fyriskipan, sum hevur verið higartil. Undir serligum umstøðum kann rætturin eftir umbøn frá ákæruvaldinum við úrskurði áseta nýggja mestutíð upp á 2 ár.
Stk. 2. Í teimum førum, sum eru nevnd í stk. 1, verður vanliga eingin mestatíð ásett, um tann dømdi verður funnin sekur í drápi, ráni, frælsistøku, grovum harðskapsbrotsverki, hóttanum av tí slagi, sum er nevnt í § 266, eldáseting, neyðtøku ella øðrum álvarsomum kynsligum brotsverki ella í roynd at fremja eitt av nevndu brotsverkum. Er eingin mestatíð ásett, leggur ákæruvaldið spurningin um at broyta ella endaliga at úrgilda fyriskipanina fyri rættin 5 ár eftir avgerðina, um spurningurin ikki hevur verið lagdur fyri rættin innan fyri tvey tey síðstu árini. Síðan verður spurningurin lagdur fyri rættin í minsta lagi annaðhvørt ár.
Stk. 3. Í sambandi við aðrar fyriskipanir enn tær, sum eru nevndar í stk. 1, verður ásett ein mestatíð fyri fyriskipanina, sum ikki kann vera longri enn 3 ár. Undir serligum umstøðum kann rætturin eftir umbøn frá ákæruvaldinum við úrskurði leingja mestutíðina. Samlaða tíðin fyri fyriskipanina kann ikki vera longri enn 5 ár.

§ 69. Var støðan hjá gerningsmanninum, tá ið revsiverda gerðin varð framd, treytað av vantandi menning, viknan ella ólagi í sálarliga virkisførinum, ið ikki er av slíkum slag, sum nevnt í § 16, kann rætturin, um tað verður hildið at vera gagnligt, í staðin fyri at døma revsing taka avgerð um fyriskipanir sambært § 68, stk. 2.

§ 69 a. Hevur fyriskipan eftir § 69 við sær, at tann dømdi skal setast í ein stovn, ella inniheldur fyriskipanin henda møguleika, verður ásett ein mestatíð upp á 5 ár fyri hesa fyriskipan, og fyri stovnsuppihaldið verður ásett ein mestatíð á vanliga ikki longri enn 1 ár. Mestatíðin upp á 5 ár fevnir eisini um fyriskipanir, sum verða ásettar seinni eftir § 72, samanber við § 69 og § 68, stk. 2, og sum hava við sær linking av fyriskipani higartil. Undir serligum umstøðum kann rætturin eftir umbøn frá ákæruvaldinum við úrskurði áseta nýggja mestutíð upp á 2 ár fyri fyriskipanina ella eina nýggja mestutíð fyri uppihaldið.
Stk. 2. Í teimum førum, sum eru nevnd í stk. 1, verður tó vanliga eingin mestatíð ásett fyri fyriskipanina, um tann dømdi verður funnin sekur í drápi, ráni, frælsistøku, grovum harðskapsbrotsverki, hóttanum av tí slagi, sum nevnt er í § 266, eldáseting, neyðtøku ella øðrum álvarsomum kynsligum brotsverki ella í roynd at fremja eitt av nevndu brotsverkum. § 68 a, stk. 2, 2. og 3. pkt., eru somuleiðis galdandi.
Stk. 3. Viðvíkjandi øðrum fyriskipanum enn teimum, sum eru nevndar í stk. 1, verður ásett ein mestatíð, sum ikki kann vera longri enn 3 ár. Undir serligum umstøðum kann rætturin eftir umbøn frá ákæruvaldinum við úrskurði leingja mestutíðina. Samlaða tíðin fyri fyriskipanina kann ikki vera longri enn 5 ár.

§ 70. Persónur kann dømast í trygdarvarðhald, um:
1) hann verður funnin sekur í drápi, ráni, frælsistøku, grovum harðskapsbrotsverki, hóttanum av tí slagi, sum nevnt er í § 266 ella

eldáseting ella í roynd at fremja eitt av nevndu brotsverkum,
2) tað eftir sermerkinum á framda tilburðinum og eftir upplýsingunum um hann persónliga, herímillum serliga um áður framdan kriminalitet, má roknast við, at hann hevur í sær nærliggjandi vanda fyri lívi, likami, heilsu ella frælsi hjá øðrum, og
3) mett verður, at neyðugt er við trygdarvarðhaldi í staðin fyri fongsli til at fyribyrgja hesum vanda.

Stk. 2. Persónur kann eisini dømast í trygdarvarðhald, um:
1) hann verður funnin sekur í neyðtøku ella øðrum álvarsomum kynsligum brotsverki ella í roynd at fremja slíkt brotsverk,
2) tað eftir sermerkinum á framda tilburðinum og eftir upplýsingunum um hann persónliga, herímillum um áður framdan kriminalitet, má roknast við, at hann hevur í sær munandi vanda fyri lívi, likami, heilsu ella frælsi hjá øðrum, og
3) mett verður, at neyðugt er við trygdarvarðhaldi í staðin fyri fongsli til at fyribyrgja hesum vanda.

§ 71. Verður talan um at døma ein ákærdan til at verða settur á stovn ella í trygdarvarðhald eftir reglunum í §§ 68-70, kann rætturin tilnevna honum ein stuðulsverja, helst ein av nærmastu avvarðandi hansara, ið saman við tilnevnda verjanum skal vera tí ákærda til hjálpar í málinum.
Stk. 2. Er tann ákærdi dømdur til at verða settur á stovn ella í trygdarvarðhald sum nevnt í stk. 1, ella gevur avgerðin møguleika fyri slíkari setan, skal hann fáa stuðulsverja tilnevndan. Hesin skal halda seg kunnaðan um støðuna hjá tí dømda og ansa eftir, at uppihaldið og aðrar fyriskipanir ikki vara longur enn neyðugt. Tilnevningin steðgar, tá ið fyriskipanin verður endaliga úrgildað.
Stk. 3. Løgmálaráðharrin ásetir neyvari reglur fyri, hvussu stuðulsverjar verða settir í starv og løntir, og hvørjar uppgávur og heimildir teirra skulu vera.

§ 72. Tað er skyldan hjá ákæruvaldinum at ansa eftir, at ein fyriskipan sambært §§ 68, 69 ella 70 ikki verður varðveitt longur og í størri mun enn neyðugt.
Stk. 2. Avgerð um at broyta ella endaliga at úrgilda fyriskipan eftir §§ 68, 69 ella 70 verður tikin við úrskurði eftir umbøn frá tí dømda, hjálparverjanum, ákæruvaldinum, stovnsleiðsluni ella kriminalforsorgini. Umbøn frá tí dømda, hjálparverjanum, stovnsleiðsluni ella kriminalforsorgini verður sett fram fyri ákæruvaldinum, ið sum skjótast leggur spurningin fyri rættin. Verður umbøn frá tí dømda ella hjálparverjanum ikki eftirlíkað, kann nýggj umbøn ikki setast fram fyrr enn hálvt ár eftir, at úrskurðurin er sagdur.
Stk. 3. Ásetingin í § 59, stk. 2, er somuleiðis galdandi fyri avgerðir eftir stk. 2. Er tað spurningur um at broyta fyriskipanina orsakað av nýggjum lógarbroti, verður spurningurin tó avgreiddur av tí rætti, ið viðger málið um brotið.

§ 73. Er tann, sum hevur framt revsiverda gerð, eftir at hon varð framd, men áðrenn dómur er fallin, komin í eina ikki bert fyribils støðu av tí í § 16 og § 69 nevnda slagi, ger rætturin av, um revsing skal dømast ella detta burtur. Verður tað hildið at vera gagnligt, kann rætturin gera av, at fyriskipanir eftir §§ 68 ella 69 skulu koma í staðin fyri revsing, ella til revsingin kann verða fullførd.
Stk. 2. Ásetingarnar í §§ 71 og 72 eru somuleiðis galdandi.
Stk. 3. Verður persónur, sum verður dømdur revsing, sambært stk. 1, 2. pkt.

settur á stovn, verður tíðin á stovninum roknað upp í revsingartíðina.

§ 73 a. Løgmálaráðharrin kann í samráð við landsstýrið áseta reglur um at geva útgonguloyvi o.a. til persónar, sum eru settir á sjúkrahús fyri sálarsjúk o.a. sambært avgerð, sum er tikin eftir §§ 68 ella 69. Løgmálaráðharrin kann í hesum sambandi áseta, at avgerðir, sum verða tiknar eftir hesum reglum, ikki kunnu leggjast fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika.
Stk. 2. Løgmálaráðharrin kann áseta reglur um nýtslu av valdi og trygdarútbúnaði yvir fyri persónum, sum eru settir á sjúkrahús fyri sálarsjúk o.a. sambært avgerð, sum er tikin eftir §§ 68 ella 69, í sambandi við flutning, ið verður fyriskipaður av starvsfólki hjá kriminalforsorgini.
Løgmálaráðharrin kann eisini áseta reglur um kanning uttan rættarúrskurð av persónum, sum eru settir á sjúkrahús fyri sálarsjúk o.a. sambært avgerð, sum er tikin eftir §§ 68 ella 69, í sambandi við flutning, ið verður fyriskipaður av starvsfólki hjá kriminalforsorgini.

§ 74. (Strikað).

§ 74 a. Um ein persónur, sum um brotsgerðarmundið ikki hevur fylt 18 ár, hevur framt grovari persónshættislig lógarbrot ella onnur álvarsom lógarbrot, kann rætturin áseta, at viðkomandi skal geva seg undir 2 ára skipaða sosialnámsfrøðiliga viðgerð, sum er undir eftirliti, um tað verður hildið at vera gagnligt til at fyribyrgja fleiri lógarbrot.
Stk. 2. Rætturin kann geva tí dømda boð, ið svara til tær fylgistreytir, sum kunnu verða álagdar sambært § 57. Mestatíðin fyri uppihaldi á samdøgursstovni ella góðkendum tilhaldi er 1 ár og 6 mánaðir, av hesum kunnu í mesta lagi 12 mánaðir vera á trygdardeild á samdøgursstovni fyri børn og ung. Fremur persónur, sum er undir fyriskipan sambært stk. 1, nýtt lógarbrot, kann rætturin í staðin fyri at døma revsing leingja um fyriskipanina, herímillum mestutíðirnar sambært 2. pkt. við upp til 6 mánaðum.
Stk. 3. Tann dømdi kann krevja, at avgerðir um flyting á trygdardeild á samdøgursstovni fyri børn og ung og avgerðir um at flyta frá viðgerð á dagdeild til seting á samdøgursstovn fyri børn og ung ella á góðkent uppihaldsstað skulu roynast í rættinum. Sama er galdandi, tá ið sosialir myndugleikar við heimild í dóminum taka avgerð um, at viðkomandi skal verða verandi á stovni út yvir ta í dóminum ásettu tíðina fyri uppihaldið. Avgerðin verður tikin við úrskurði. At málið verður lagt fyri rættin hevur ikki steðgandi virknað. Ásetingin í § 59, stk. 2, er somuleiðis galdandi.
Stk. 4. Løgmálaráðharrin kann í samráð við landsstýrið áseta reglur um at geva útgonguloyvi o.a. til persónar, sum eru undir fyriskipan sambært stk. 1 og 2. Løgmálaráðharrin kann í hesum sambandi áseta, at avgerðir, sum verða tiknar eftir hesum reglum, ikki kunnu leggjast fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika.

§ 75. Úrtøka frá revsiverdari gerð ella samsvarandi upphædd kann verða inndrigin heilt ella lutvíst. Er ikki neyðugt grundarlag til at staðfesta støddina á upphæddini, kann inndragast ein upphædd, ið verður mett at svara til úrtøkuna.
Stk. 2. Verður tað mett neyðugt til at fyribyrgja fleiri lógarbrot ella tala serligar umstøður annars fyri tí, kunnu verða inndrignir:

1) lutir, sum hava verið brúktir ella ætlaðir at vera brúktir til eina revsiverda gerð,
2) lutir, sum eru framleiddir við einari revsiverdari gerð, og
3) lutir, við hvørjum tað aðramáta er framd ein revsiverd gerð.

Stk. 3. Í staðin fyri inndrátt av teimum lutum sum eru nevndir í stk. 2, kann inndragast ein upphædd, ið svarar heilt ella lutvíst til virðið á lutunum.
Stk. 4. Í staðin fyri inndrátt sambært stk. 2 kann verða avgjørt at seta í verk tiltøk viðvíkjandi lutunum til at fyribyrgja fleiri lógarbrotum.
Stk. 5. Tá ið felagsskapur verður avtikin við dómi, kunnu ognir og virðir annars hjá felagsskapinum verða inndrigin.

§ 76. Inndráttur eftir § 75, stk. 1, kann verða framdur hjá tí, sum beinleiðis hevur fingið úrtøkuna av revsiverdu gerðini.
Stk. 2. Inndráttur av lutum og virðum, sum eru nevnd í § 75, stk. 2 og 3, kann verða framdur hjá tí, sum stendur til svars fyri lógarbrotinum, og hjá tí, hvørs vegna hann hevur handlað.
Stk. 3. Serliga tryggjaði rættindi yvir lutum, sum verða inndrignir, detta einans burtur, um rætturin tekur avgerð um tað eftir treytum, ið svara til teirra, sum eru nevndar í stk. 2.
Stk. 4. Hevur ein av teimum persónum, sum eru nevndir í stk. 1 og 2, aftan á revsiverdu gerðina rátt yvir úrtøku ella lutum sambært § 75, stk. 2, ella rættindi yvir teimum, kann tað avhendaða ella virðið á tí verða inndrigið hjá ognaranum, um hesin visti um sambandið, sum tað avhendaða hevði við revsiverdu gerðina. Tað sama er galdandi, um hann hevur víst grovt ósketni í hesum sambandi, ella um avhendingin hevur verið framd sum gáva.
Stk. 5. Doyr persónur, sum hevur inndráttarábyrgd eftir stk. 1-4, dettur ábyrgd hansara burtur. Hetta er tó ikki galdandi fyri inndrátt eftir § 75, stk. 1.

§ 76 a. Heilur ella lutvísur inndráttur kann gerast av ognum hjá persóni, sum verður funnin sekur í revsiverdari gerð, tá ið:

1) gerðin er av slíkum slag, at hon kann geva munandi úrtøku, og
2) gerðin sambært lóg kann revsast við fongsli í 6 ár ella meira, ella er brot á lóggávuna um euforiserandi evni.

Stk. 2. Undir treytum, sum eru nevndar í stk. 1, kann heilur ella lutvísur inndráttur gerast av ognum, sum hjúnafelagin ella sambúgvin hjá viðkomandi hevur ognað sær, uttan so at:

1) ognarluturin er útvegaður meiri enn 5 ár fyri ta revsiverdu gerðina, sum er grundarlagið fyri inndráttin eftir stk. 1, ella
2) hjúnalagið ella fastasamlívið ikki var, tá ið ognarluturin varð útvegaður.

Stk. 3. Undir treytum, sum eru nevndar í stk. 1, kann heilur ella lutvísur inndráttur gerast av ognum, sum eru avhendar til løgfrøðiligan persón, sum viðkomandi einsamallur ella saman við nærmastu sínum hevur avgerandi ávirkan á. Sama er galdandi, um viðkomandi fær munandi part av inntøkunum hjá løgfrøðiliga persóninum. Inndráttur kann tó ikki verða framdur, um ognin er avhend til løgfrøðiliga persónin meiri enn 5 ár fyri ta revsiverdu gerðina, sum er grundarlagið fyri inndráttin eftir stk. 1.
Stk. 4. Inndráttur eftir stk. 1-3 kann ikki verða gjørdur, um viðkomandi ger tað sannlíkt, at ein ognarlutur er útvegaður á lógligan hátt ella fyri lógliga útvegaða peningaognn.
Stk. 5. Í staðin fyri at inndraga ávísar ognarlutir eftir stk. 1-3 kann verða inndrigin ein upphædd, ið svarar til heilt ella lutvíst virði á ognunum.

§ 77. Verður inndrigið eftir § 75, stk. 1, ella § 76 a, og hevur onkur endurgjaldskrav í sambandi við lógarbrotið, kann tað inndrigna verða brúkt til at dekka endurgjaldskravið.
Stk. 2. Sama er galdandi fyri lutir og virðir, sum eru inndrigin eftir § 75, stk.

2 og 3, um avgerð verður tikin um tað í dóminum.
Stk. 3. Hevur tann dømdi í onkrum av teimum førum, sum eru nevnd í stk. 1 og 2, goldið tí órættaða endurgjald eftir dómin, verður inndráttarupphæddin minkað samsvarandi.

§ 77 a. Lutir kunnu inndragast, um stúrt verður fyri, at teir, vegna slag og í samband við aðrar ítøkiligar umstøður, fara at verða brúktir í eini revsiverdari gerð, og tað verður mett neyðugt til tess at fyribyrgja revsiverdu gerðini. Undir somu treytum kunnu aðrir ognarlutir verða inndrignir, herímillum peningur. § 75, stk. 4, er somuleiðis galdandi.

§ 78. Revsiverd viðurskifti hava ikki við sær miss av borgarligum rættindum, herímillum rætt at virka sambært vanligum vinnubrævi ella sjóvinnubrævi.
Stk. 2. Tann, sum er dømdur fyri revsiverd viðurskifti, kann tó verða útihýstur frá at reka virksemi, sum krevur serliga almenna løggilding ella góðkenning, um framda gerðin gevur orsøk til at halda, at nærliggjandi vandi er fyri misnýtslu av starvinum ella vinnuni.
Stk. 3. Spurningar um, hvørt framda gerðin er til hindurs fyri at reka virksemi, sum nevnt er í stk. 2, skulu verða lagdir fyri rættin av ákæruvaldinum eftir áheitan antin frá honum, sum hevur fingið noktandi svar upp á umsókn um slíka løggilding ella góðkenning, ella frá viðkomandi myndugleika. § 59, stk. 2 er somuleiðis galdandi. Avgerðin verður tikin við úrskurði.
Stk. 4. Ger rætturin av at útihýsa einum frá at reka viðkomandi virksemi, kann spurningurin leggjast fyri rættin av nýggjum, tó ikki fyrr enn 2 ár eru liðin. Viðkomandi myndugleiki kann tó geva løggildingina ella góðkenningina aftur, áðrenn 2 ára freistin er liðin.

§ 79. Tann, ið rekur virksemi, sum er nevnt í § 78, stk. 2, kann við dómi fyri revsiverd viðurskifti missa rættin til at halda áfram við at reka viðkomandi virksemi ella til at reka tað á ávísan hátt, um framda gerðin gevur orsøk til at halda, at nærliggjandi vandi er fyri misnýtslu av starvinum ella støðuni.
Stk. 2. Tá ið serligar umstøður tala fyri tí, er sama galdandi fyri at reka annað virksemi. Eftir somu reglu kann verða frádømdur rætturin til at vera í leiðsluni av einum vinnuvirki her á landi ella uttanlands, uttan at ábyrgjast persónliga og óavmarkað fyri skyldurnar hjá vinnuvirkinum.
Stk. 3. Frádømingin kann vara úr 1 upp í 5 ár, roknað frá endaligum dómi. Frádømingin kann eisini vara í óásetta tíð, men í hesum føri skal, tá ið 5 ár eru liðin, spurningurin um framhaldandi útihýsing frá viðkomandi virksemi leggjast fyri rættin sambært reglunum í § 78, stk. 3 og 4. Tá ið serligar umstøður tala fyri tí, kann løgmálaráðharrin geva loyvi til, at spurningurin verður lagdur fyri rættin, áðrenn freistin, sum er nevnd í 2. pkt. er liðin.
Stk. 4. Undir viðgerðini av teimum málum, sum eru nevnd í stk. 1 og 2, kann rætturin við úrskurði útihýsa viðkomandi frá at reka virksemið, til málið er endaliga avgjørt. Í dóminum kann verða ásett, at tað ikki hevur steðgandi virknað at skjóta málið inn fyri hægri rætt."

12. Kapittul 10 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 10**
At áseta revsing

§ 80. Tá ið revsing verður ásett, skal við fyriliti fyri einsháttaðari rættarreglunýtslu leggjast dentur á grovleikan á lógarbrotinum og á upplýsingar um gerningsmannin.
Stk. 2. Tá ið mett verður um grovleikan á lógarbroti, skal atlit takast at tí skaða,

vanda og teirri skemd, ið lógarbrotið hevur við sær, og hvat gerningsmaðurin skilti ella átti at havt skilt. Tá ið mett verður um upplýsingarnar um gerningsmannin, skal atlit takast at vanligu persónligu og sosialu viðurskiftum hansara, at viðurskiftum hansara fyri og eftir gerðina og orsøkum hansara til gerðina.
Stk. 3. Í meting sambært stk. 2 er tað ikki at rokna sum linnandi umstøður, at gerðin er grundað á trúgv, mentanarlig viðurskifti ella tílíkt.

§ 81. Tá ið revsing verður ásett, skal tað vanliga roknast sum skerpandi umstøður:

1) at gerningsmaðurin áður er revsaður, og tað hevur týdning fyri málið,
2) at fleiri hava framt gerðina í felag,
3) at gerðin er serliga væl løgd til rættis ella er liður í víðfevndum lógarbrotum,
4) at gerningsmaðurin ætlaði, at gerðin skuldi hava munandi álvarsamari avleiðingar, enn hon fekk,
5) at gerningsmaðurin hevur víst serligt fyrilitsloysi,
6) at gerðin hevur støði í annans etniska uppruna, trúgv, kynsliga samleika ella tílíkt,
7) at gerðin hevur støði í lógligari framsøgn hjá tí órættaða í almennum orðaskifti,
8) at gerðin er framd undir útinning av almennari tænastu ella starvi ella við misnýtslu av starvi ella serligum álitissambandi annars,
9) at gerningsmaðurin hevur fingið annan persón at viðvirka til gerðina við tvingsli, sviki ella við at misnýta annans unga aldur ella munandi fíggjarligu ella persónligu trupulleikar, manglandi innlit, gáloysni ella bundinskap,
10) at gerningsmaðurin hevur viðvirkað til lógarbrot, sum er framt av barni undir 15 ár,
11) at gerningsmaðurin hevur misnýtt verjuleysu støðuna hjá tí órættaða,
12) at gerðin er framd av persóni, sum:
    a) er varðhaldsfongslaður ella undir fyriskipan, ið kemur í staðin fyri varðhaldsfongsling,
    b) situr revsing ella aðra frælsisskerjandi revsirættarliga rættarfylgju, ella
    c) hevur seg undan revsing ella aðrari frælsisskerjandi revsirættarligari rættarfylgju,
13) at gerðin er framd av persóni, sum hevur verið varðhaldsfongslaður ella undir fyriskipan, ið kemur í staðin fyri varðhaldsfongsling, ella av persóni, sum hevur sitið revsing ella aðra frælsisskerjandi revsirættarliga rættarfylgju, og gerðin er framd ímóti stovninum ella ímóti persóni, sum er í starvi á stovninum, ella
14) at gerðin hevur støði í útinningini av almennari tænastu ella starvi hjá tí órættaða ella nærmastu hansara.

§ 82. Tá ið revsing verður ásett, skal tað vanliga verða roknað sum linnandi umstøður:

1) at gerningsmaðurin ikki var fyltur 18 ár, tá ið gerðin varð framd,
2) at gerningsmaðurin hevur høgan aldur, og tá ið brúk av vanligari revsing er óneyðug ella skaðilig,
3) at gerðin gongur at markinum at vera fevnd av revsingarloysisgrund,
4) at gerningsmaðurin hevur handlað í umberandi ókunnleika um ella umberandi misskiljing av rættarreglum, sum forbjóða ella áleggja, at gerðin verður framd,
5) at gerðin er framd í sinnismuni, sum tann órættaði ella persónar, ið hava tilknýti til hansara, hava elvt til við einum álopi av órøttum ella við grovari niðran,

6) at gerðin er framd sum fylgja av tvingsli, sviki ella við at misnýta unga aldur gerningsmansins ella munandi fíggjarligu ella persónligu trupulleikar, manglandi innlit gáloysni ella bundinskap hansara,
7) at gerðin er framd í sterkari samkenslu ella sinnisrørslu, ella tað eru aðrar serligar upplýsingar um sinnisstandin hjá gerningsmanninum ella umstøðurnar annars í sambandi við gerðina,
8) at gerningsmaðurin sjálvboðin hevur forðað fyri ella hevur roynt at forðað fyri tí vanda, sum er skaptur við teirri revsiverdu gerðini,
9) at gerningsmaðurin sjálvboðin hevur meldað seg og hevur givið treytaleysa ájáttan,
10) at gerningsmaðurin hevur givið upplýsingar, sum eru avgerandi fyri uppkláringina av revsiverdum gerðum, sum onnur hava framt,
11) at gerningsmaðurin hevur afturbøtt ella hevur roynt at afturbøtt tann skaða, sum er skaptur við teirri revsiverdu gerðini,
12) at gerningsmaðurin orsakað av teirri revsiverdu gerðini missir rættin til eitt av teimum í § 79 nevndu rættindum, ella skal tola aðrar fylgjur, ið kunnu javnsetast við revsing,
13) at revsimálið ímóti gerningsmanninum ikki er avgreitt innan fyri rímiliga tíð, uttan at tað kann lastast gerningsmanninum, ella
14) at so long tíð er liðin, síðan tann revsiverda gerðin varð framd, at vanlig revsing er óneyðug.

§ 83. Revsingin kann minkast niður um ta ásettu revsirammuna, tá ið upplýsingar um gerðina, gerningsmannin ella onnur viðurskifti avgerandi tala fyri tí. Eru umstøðurnar aðramáta linnandi, kann revsingin detta burtur.

§ 84. Ein treyt fyri at nýta áseting um herda revsing ella aðra rættarfylgju í endurtøkuførum er, at gerningsmaðurin, áðrenn hann aftur breyt lógina, er funnin sekur í at hava framt revsiverda gerð, sum lógin gevur endurtøkuvirknað á ta nú framdu gerðina, ella roynd at fremja ella at viðvirka til slíka gerð.
Stk. 2. Rætturin kann geva revsidómum, ið eru sagdir uttan fyri ríkið sama endurtøkuvirknað sum teimum, ið eru sagdir her á landi.
Stk. 3. Endurtøkuvirknaður endar, tá ið tað, áðrenn nýggja revsiverda gerðin varð framd, eru liðin 10 ár, síðan fyrr dømda revsingin er sitin, endaliga eftirgivin ella burturdottin. Var fyrr dømda revsingin sektarrevsing, verður nevnda freist roknað frá dagfestingini á tí endaliga dóminum ella sektaravgerðini. Í treytaðum dómi verður freistin roknað frá tí endaliga dóminum.

§ 85. (Strikað).

§ 86. Hevur tann dømdi verið handtikin, varðhaldsfongslaður ella innlagdur til sálarkanningar, verður dømda fongsulsrevsingin stytt við so nógvum byrjaðum døgum, sum frælsistøkan ella innleggingin hava vart.
Stk. 2. Frælsistøka, styttri enn 24 tímar, hevur ikki stytting við sær.
Stk. 3. Hevur tann dømdi undir frælsistøkuni verið avbyrgdur eftir avgerð hjá rættinum, verður dømda fongsulsrevsingin stytt ein dag afturat fyri hvørt byrjað tíðarskeið upp á tríggjar dagar, ið tann dømdi hevur verið avbyrgdur.
Stk. 4. Dómurin skal upplýsa um longdina á teirri frælsistøku, innlegging ella avbyrging, sum hevur stytting við sær.

Stk. 5. Rætturin kann sum undantak gera av, at øll revsingin er at rokna sum sitin, hóast dømda revsingin er longri enn tíðin, sum tann dømdi hevur verið frælsisskerdur ella innlagdur.
Stk. 6. Verður dómsskot burturvíst ella tikið aftur, verður henda avgerð tikin av yvirskipaða rættinum við samtykt. Er sektarrevsing dømd, skal í dóminum vera ásett, at sektin heilt ella lutvíst er at rokna sum staðin.
Stk. 7. Verður dømt eftir § 58, stk. 1, skal stytting gerast í treytaleysa partinum av revsingini. Í dóminum kann tó verða ásett, at stytting ikki ella bert lutvíst skal gerast í treytaleysa partinum av revsingini.
Stk. 8. Er samfelagstænasta dømd, skal stytting, ið sambært stk. 7 ikki verður gjørd í møguliga treytaleysa partinum av revsingini, gerast lutfalsliga í dømda tímatalinum av samfelagstænastu.
Stk. 9. Ásetingarnar í stk. 1-8 eru at nýta á sama hátt í rættaravgerð eftir § 60, stk. 1, nr. 3, ella § 66, stk. 1, nr. 1, tá ið tann, sum hevur fingið treytaðan dóm, áðrenn avgerðina hevur verið handtikin ella varðhaldsfongslaður.
Stk. 10. Hevur tann dømdi verið handtikin, varðhaldsfongslaður ella innlagdur til sálarkanningar uttanlands, ger rætturin av, hvussu nógv tann dømda revsingin skal styttast.
Stk. 11. Ásetingarnar í stk. 1, 1. og 2. pkt., eru somuleiðis galdandi fyri persónar, sum skulu inn at sita fongsulsrevsing, eftir at hava verið handtiknir ella varðhaldsfongslaðir fyri brot á fylgistreytir fyri náðing ella royndarleyslating.

§ 87. (Strikað).

§ 88. Hevur onkur við einari ella fleiri gerðum framt fleiri lógarbrot, verður fyri hesi brot ásett felags revsing innan fyri ásettu revsirammuna ella, um fleiri revsirammur koma upp á tal, innan fyri ta strangastu teirra. Undir serliga skerpandi umstøðum kann revsingin vera upp til hálva aðru ferð ta harðastu revsingina, sum ásett er fyri eitthvørt av lógarbrotunum.
Stk. 2. Hevur eitt av lógarbrotunum við sær fongsul, meðan eitt annað hevur við sær sekt, kann rætturin heldur enn felags fongsulsrevsing døma sekt og fongsul.
Stk. 3. Hevur eitt av lógarbrotunum við sær dagsekt, meðan eitt annað hevur við sær sektarrevsing av øðrum slagi, ásetir rætturin felags dagsektarrevsing, um tað ikki eftir umstøðunum verður mett at vera rættari at áseta revsing fyri hvørt lógarbrot sær.
Stk. 4. Hevur eitt av lógarbrotunum við sær fyriskipan eftir §§ 68-70 ella § 74 a, meðan eitt annað hevur við sær revsing, kann rætturin gera av, at henda revsing dettur burtur.

§ 89. Verður onkur, sum longu er dømdur revsing, harumframt funnin sekur í aðrari revsiverdari gerð, sum er framd áðrenn dómin, skal eykarevsing dømast, um so er, at revsingin hevði verið harðari, um dømt varð fyri gerðirnar samstundis. Eykarevsing kann vera styttri enn ásett í § 33. Er fyrr dømda revsingin ikki fullgjørd, skulu reglurnar í § 88 fylgjast, um til ber.

§ 89 a. Í sambandi við dóm, har persónur verður dømdur til fyriskipan sambært §§ 68-70 ella § 74 a, kann rætturin taka avgerð um, at áður dømd revsing, ið ikki er fullgjørd, skal detta burtur.
Stk. 2. Verður persónur, sum er undir fyriskipan sambært §§ 68-70 ella § 74 a, dømdur revsing, kann rætturin taka avgerð um, at áður dømd fyriskipan skal detta burtur.

§§ 90-91. (Strikaðar).”

13. Kapittul 11 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 11**
Uppathald av rættarfylgjum av teirri revsiverdu gerðini

§ 92. Lógarbrot verður ikki revsað, tá ið tað er fyrnað sambært §§ 93-94.

§ 93. Fyrningarfreistin er:
1) 2 ár, tá ið heimild ikki er fyri harðari revsing enn fongsul í 1 ár fyri lógarbrotið.
2) 5 ár, tá ið heimild ikki er fyri harðari revsing enn fongsul í 4 ár.
3) 10 ár, tá ið heimild ikki er fyri harðari revsing enn fongsul í 10 ár.
4) 15 ár, tá ið heimild ikki er fyri harðari revsing enn fongsul í ávísa tíð.

Stk. 2. Fyrningarfreistin er ongantíð minni enn 5 ár fyri:
1) brot á § 296, stk. 3, § 297, stk. 2, og § 302, stk. 2 í hesi løgtingslóg, og
2) brot á skattalóggávuna, tolllóggávuna, avgjaldslóggávuna ella stuðulslóggávuna, ið geva ella kunnu geva vinning av órøttum.

Stk. 3. Fyrningarfreistin er ongantíð minni enn 10 ár fyri brot á § 223, stk. 1, § 225, samanber við § 223, stk. 1 í hesi løgtingslóg ella § 139 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.
Stk. 4. Hevur onkur við somu gerð framt fleiri lógarbrot, sum tað sambært stk. 1 og 2 galda ymsar fyrningarfreistir fyri, skal longsta fyrningarfreistin av hesum galda fyri øll brotini.

§ 93 a. Revsiábyrgd fyrnast ikki, tá ið lógarbrotið er fevnt av millumtjóða sáttmála, ið Føroyar hava tikið undir við, og sáttmálin ásetir, at revsiábyrgdin ikki fyrnast.

§ 93 b. Revsiábyrgd fyrnast ikki, tá ið lógarbrotið er fevnt av § 157 a.

§ 94. Fyrningarfreistin verður roknað frá tí degi, tá ið revsiverda gerðin ella undanlátið er hildið uppat.
Stk. 2. Tá ið revsingarbærið er treytað av ella verður ávirkað av fylgju ella aðrari seinni hending, verður freistin tó roknað frá tí, at fylgjan ella hendingin byrjaði.
Stk. 3. Er brotið framt á føroyskum skipi uttan fyri ríkið, verður freistin roknað frá tí degi, at skipið er komið í føroyska havn. Freistarbyrjanin kann tó ikki útsetast í meira enn 1 ár eftir hesi áseting.
Stk. 4. Fyri brot á §§ 210 og 216-224, § 225 sambært §§ 216-224, § 226, § 227, stk. 1, § 245 a, § 246, samanber við § 245 a, § 260, stk. 2, og § 262 a, stk. 2, móti einum persóni undir 18 ár, ella á § 232 móti einum barni undir 15 ár, verður fyrningarfreistin tó í fyrsta lagi roknað frá tí degi, at tann órættaði fyllir 21 ár.
Stk. 5. Sama sum í stk. 4 er galdandi fyri brot á §§ 244, 245 og 246, tá ið talan er um fosturtøku, fosturfækkan ella sterilisering móti einum persóni undir 18 ár uttan samtykki, um hetta ikki er heimilað í lóg.
Stk. 6. Um gerningsmaðurin við harðskapi, ólógligum tvingsli sambært § 260 ella við aðrari revsiverdari gerð hevur tvingað tann órættaða til ikki at melda lógarbrotið til løgregluna, verður fyrningarfreistin tó í fyrsta lagi roknað frá tí løtu, at tvingsilin er hildin uppat.
Stk. 7. Fyrningarfreistin verður slitin, tá ið viðkomandi verður kunnaður um skuldsetingina, ella tá ið ákæruvaldið biður um rættargangsstig, sum hava við sær, at viðkomandi verður skuldsettur. Fyrningarfreistin fyri ábyrgdini hjá løgfrøðiligum persóni kann verða slitin við at kunnuggera tað fyri persóni, ið sambært § 205 í rættargangslógini kann taka ímóti kunnuggeringum vegna tann løgfrøðiliga persónin.

Stk. 8. Verður rættarsókn slept, uttan at verða umgjørd av yvirskipaðum ákæruvaldi áðrenn vanligu freistina fyri umgerð, heldur fyrningarfreistin áfram, sum um rættarsókn ikki hevði verið. Hetta er eisini galdandi, tá ið rættarsókn steðgar í óásetta tíð. Kemst steðgurin av, at tann ákærdi hevur sloppið sær undan rættarsóknini, telur rættarsóknartíðin ikki við, tá ið fyrningarfreistin verður roknað.

§ 95. Tá ið ein gerð ikki kann revsast, av tí at hon er fyrnað, kann hon heldur ikki hava við sær:
1) rættarfylgjur eftir §§ 68-70, § 74 a, § 164, stk. 5, ella § 236,
2) inndrátt, ella
3) rættindamiss.

Stk. 2. Fyrningarfreistin er tó ongantíð styttri enn 5 ár fyri inndrátt, og fyri inndrátt eftir § 75, stk. 1 ongantíð styttri enn 10 ár.

§ 96. Rætturin til privata átalu og til at biðja um almenna átalu dettur burtur, tá ið tann, sum hevur átalurættin, ikki hevur stevnt ella biðið um átalu innan 6 mánaðir eftir, at hann hevur fingið slíka vitan, at hann hevur nóg gott grundarlag til at stevna ella at biðja um átalu.
Stk. 2. Eru fleiri, sum hava átalurætt ella eru sek, verður freistin roknað fyri hvønn sær. Um so er, at freistin til at biðja um almenna átalu er farin fyri ein av teimum seku, men ikki hjá hinum, ger ákæruvaldið tó av, um ein áheitan um at reisa átalu ímóti teimum verður eftirlíkað.
Stk. 3. Rætturin til at reisa privata átalu ella til at biðja um almenna átalu dettur burtur 6 mánaðir eftir, at tann órættaði er deyður.
Stk. 4. Fellur eingin avgerð um revsingarkravið í máli, sum er lógsøkt við privatari átalu, heldur fyrningarfreistin fram, og tann tíð, rættarsóknin hevur vart, verður ikki tald uppí.
Stk. 5. Ásetingarnar í stk. 1-4 galda eisini fyri ógilding eftir § 273, tó at fyrningarfreistin er 3 ár.

§ 97. Dømd fongsulsrevsing og onnur rættarfylgja av frælsisskerjandi slagi detta burtur við fyrning eftir reglunum í stk. 2-6.
Stk. 2. Fyrningarfreistin er:
1) 5 ár fyri fongsul í upp til 1 ár og fyri fyriskipanir sambært § 74 a,
2) 10 ár fyri fongsul í meira enn 1 ár, men ikki meira enn 4 ár, og fyri fyriskipanir sambært §§ 68 og 69,
3) 15 ár fyri fongsul í meira enn 4 ár, men ikki meira enn 8 ár, og fyri trygdarvarðhald sambært § 70, og
4) 20 ár fyri fongsul í meira enn 8 ár.

Stk. 3. Fyrningarfreistin verður roknað frá teirri løtu, ið dómurin kundi verið fullgjørdur sambært vanligu reglunum í lóggávuni.
Stk. 4. Upp í fyrningarfreistina verður ikki roknað tann tíð, har:
1) fullgerð er útsett við treytaðum dómi ella treytaðari náðing,
2) viðkomandi situr aðra fongsulsrevsing ella er undir aðrari revsirættarligari rættarfylgju av frælsisskerjandi slagi, ella
3) fullgerðin verður tarnað, tí at viðkomandi sleppur sær undan henni.

Stk. 5. Fyrningarfreistin verður slitin, tá ið fullgerðin byrjar.
Stk. 6. Er avgerð tikin um innafturseting eftir royndarleyslating ella royndarútskriving ella eftir treytaða náðing fyri part av revsing, verður fyrningarfreistin fyri írestandi revsingina ella írestandi partin av aðrari rættarfylgju roknað frá tí, at avgerðin um innafturseting er tikin. Verður fullgerðin avbrotin á annan hátt enn við royndarleyslating, royndarútskriving ella náðing, verður freistin roknað frá avbrotinum, samanber tó við stk. 4, nr. 3.

§ 97 a. Er umbøn um úttøku ikki innlatin áðrenn, dettur sekt burtur eftir:
1) 5 árum, um sektin ikki er størri enn 10.000 kr., og
2) 10 árum, um sektin er størri enn 10.000 kr.

Stk. 2. Umskiftisrevsing fyri sekt dettur burtur eftir 3 árum, um fullgerðin ikki er byrjað áðrenn. Er sektin størri enn 10.000 kr., er freistin tó 5 ár.
Stk. 3. Tær fyrningarfreistir, sum eru nevndar í stk. 1, verða roknaðar frá teirri løtu, tá ið avgerðin kundi verið fullgjørd sambært vanligu reglunum í lóggávuni. Upp í freistirnar verður ikki roknað tann tíð, har fullgerð er útsett við treytaðum dómi ella treytaðari náðing.
Stk. 4. Fyrningarfreistin fyri inndráttarkrav er 10 ár.

§ 97 b. Revsirættarligar rættarfylgjur kunnu ikki fullgerast, eftir at tann dømdi er deyður.
Stk. 2. Ákæruvaldið kann tó leggja spurningin um at framleingja inndrátt fyri Føroya rætt. Inndrátturin kann bert framleingjast fyri lutir ella upphæddir, sum eru fingin sum úrtøka frá revsiverdu gerðini, ella sum svara til slíka úrtøku.
Stk. 3. Rætturin kann broyta avgerðina um inndráttin soleiðis, at ein upphædd verður inndrigin í staðin fyri lutir. Avgerðin hjá rættinum verður tikin við úrskurði.
Stk. 4. Avgerðir eftir § 164, stk. 5, kunnu fullgerast, eftir at tann dømdi er deyður.

§ 97 c. Á sama hátt sum viðvíkjandi revsing kann náðing gevast viðvíkjandi inndrátti."

14. Í § 124, stk. 2 og 3 verður "heimansettan persón" broytt til: "tvingsilssettan persón".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Á heysti 2015 samtykti Løgtingið at heita á landsstýrið um at dagføra og føroyska revsilógina. Arbeiðið við at dagføra og føroyska revsilógina fór í gongd í 2016. Tað var tá gjørt av at býta dagføringina sundur í hóskandi partar, soleiðis at bæði landsstýrið og Løgtingið fingu høvi at viðgera dagføringarnar betur og gjøllari bæði málsliga og innihaldsliga.

Í sambandi við at revsilógin verður føroyskað, skal verða gjørt vart við, at tað ikki er ætlanin, at føroyski teksturin innihaldsliga skal víkja frá danska tekstinum. Í teimum førum tá ið føroysk viðurskifti hava gjørt, at onkrar ásetingar í donsku revsilógini ikki eru tiknar við, ella at tað hevur verið neyðugt at gjørt broytingar, er tað greitt tilskilað í serligu viðmerkingunum.

Tá ið ein áseting einans er umsett úr donskum til føroyskt, skal føroyska ásetingin innihaldsliga skiljast á sama hátt sum tann danska.

Serligar viðmerkingar eru tí bert gjørdar, tá ið ein innihaldslig broyting er gjørd í mun til tekstin í donsku revsilógini, umframt at greitt verður frá málsligum valum, tá ið málsligir spurningar hava stungið seg upp.

Við hesum uppskoti verður almenni parturin av revsilógini borin í tingið. Hesin parturin fevnir um kapitlarnar 1 til 11, og sum heitið sigur, er talan um almennar ásetingar, sum eru um tær vanligu treytirnar fyri at kunna revsa. Tá ið hesin parturin er samtyktur av Løgtinginum, er øll revsilógin á føroyskum máli.

Uppskotið tekur støðið í hesum donsku broytingarlógum:

- Lov nr. 230 af 4. april 2000 om ændring af straffeloven (Udvidet brug af samfundstjeneste og betingede domme med vilkår om alkoholistbehandling for spirituskørsel)
- Lov nr. 433 af 31. maj 2000 om ændring af forskellige lovbestemmelser i forbindelse med gennemførelsen af en lov om fuldbyrdelse af straf m.v. (Ændringer som følge af straffuldbyrdelsesloven, afskaffelse af hæftestraffen og prøveløsladelse af livstidsdømte m.v.)
- Lov nr. 152 af 18. februar 2015 om ændring af straffeloven og lov om fuldbyrdelse af straf m.v. (Samfundstjeneste m.v.)

Almenni parturin fevnir um hesar kapitlarnar: Kap. 1: Innleiðandi ásetingar, kap. 2: Vanligar treytir fyri at nýta revsirættarligar ásetingar, kap. 3: Treytir fyri revsingarbæri, kap. 4: Brotsroynd og viðvirkan, kap. 5: Revsiábyrgd fyri løgfrøðiligar persónar, kap. 6: Revsingarnar, kap. 7: Treytað fongsulsrevsing, kap. 8: Samfelagstænasta, kap. 9: Aðrar rættarfylgjur av teirri revsiverdu gerðini, kap. 10: At áseta revsing og kap. 11: Uppathald av rættarfylgjum av teirri revsiverdu gerðini.

Uppskotið er umrøtt við Revsirættarliga Ráðnum.
Revsirættarliga Ráðið varð sett, tá ið revsirætturin var yvirtikin í 2010. Limirnir í ráðnum hava praktiskar royndir innan revsirætt og ráðið er ætlað at ráðgeva landsstýrismanninum og aðalráðnum viðvíkjandi revsirætti. Revsirættarliga Ráðið hevur ongan formann, ger vanliga ikki felags ummæli ella niðurstøður og hevur onga formliga støðu.

Málráðið hevur vegleitt í málsligum ivamálum. Orð, sum eru góðkend av Málráðnum í samband við arbeiðið við revsilógini, eru sett á ein lista við góðkendum orðum. Orðalistin er settur sum skjal 2 til uppskotið.

Harafturat er lógaruppskotið umrøtt við danska løgmálaráðið, sum hevur sagt sína hugsan um broytingarnar í kapitli 2.

Samstundis sum revsilógin er blivin føroyskað, eru eisini umbidnar og neyðugar dagføringar gjørdar so hvørt.

Revsirættur er ein týðandi partur av einum samfelag og eigur í størst møguligan mun at avspegla samfelagið, sum hann virkar í. Danska revsilógin er í stóran mun úrslit av tí samfelagsgongd, sum hevur verið í Danmark síðstu øld og fram til í dag. Føroyska samfelagið er nógv minni og er meira gjøgnumskygt. Samstundis hevur kriminaliteturin í Føroyum verið nógv lægri enn í Danmark, kanska tí at óformliga revsingin frá samfelagnum er hørð.

Í arbeiðinum at føroyska revsilógina er støða ikki tikin til, hvussu revsirætturin frameftir eigur at skipast. Revsilógin, sum hon er orðað, tá ið hetta uppskotið er samtykt, ber málsliga brá av at verða týdd úr donskum, hóast at roynt hevur verið at gera málið einfaldari og at skipa lógina við fleiri greinum og stykkjum, so lógin verður lættari at lesa hjá vanligum borgarum, samstundis sum dentur er lagdur á at varðveita neyðugan neyvleika.

Landsstýrismaðurin ætlar at fara undir at gera eina nýggja føroyska revsilóg, sum leggur seg tættari upp at føroyska málinum, og har tað í størri mun enn nú verður tikið atlit at føroyska samfelagsbygnaðinum.

Tað eru tó ávísar bindingar, sum mugu virðast í sambandi við eina tílíka tilgongd. Í yvirlýsingini í sambandi við yvirtøku av málsøkinum "revsirættur" frá 15. mai 2009 er ásett, at partarnir eru samdir um framhaldandi at hava eitt tætt samstarv á tí revsirættarliga økinum eftir yvirtøkuna við atliti at tryggja, at tað í Føroyum og í Danmark er ein felags virðing fyri megingrundleggjandi virðum og grundreglum, sum kemur til sjóndar í rættar- og lóggávusiðvenjuni.

Somuleiðis er tað ásett í viðmerkingunum til yvirtøkulógina (Lov nr. 578 af 24. maj 2005 om de færøske myndigheders overtagelse af sager og sagsområder), at føroyska revsilógin eisini eftir yvirtøkuna hevur ásetingar, sum í størstan mun samsvara við ásetingarnar í kapittul 12 og 13 í donsku revsilógini.

Tað sæst tó eisini í viðmerkingunum til yvirtøkulógina, at rættarstøðan í Føroyum og Danmark kann mennast ymiskar vegir eftir yvirtøkuna.

1.2. Galdandi lóggáva

Almenni parturin av revsilógini viðger tær vanligu treytirnar fyri at revsa og revsiatgerðirnar (sanktionerne). Hesar reglur eru eisini galdandi, tá ið revsiásetingar í aðrari serlóggávu verða nýttar.

Ásetingarnar í galdandi lóg eru orðaðar á donskum og hava upprunastøði í donskum myndugleikum.

Galdandi revsilóg í Føroyum er tillagað eftir donsku revsilógini, sum kom í gildi í 1933, og sum er broytt nógvar ferðir gjøgnum árini.

Almenni parturin fevnir um evnir, sum hava týdning fyri øll sløg av revsiverdum gerðum.

Í stuttum kann sigast, at hesar treytir skulu vera loknar fyri at kunna revsa:

1) Gerðin má verða í ósamsvari við eina revsiáseting,
2) uttan at tað eru serligar revsiloysisgrundir,
3) tað má verða ein ábyrgdarpersónur,
4) sum hevur framt gerðina við neyðugum saknæmi (tilregnelighed),
5) og uttan at tað eru grundir til at revsingin heldur uppat (t.d. fyrning)

Í almenna partinum verður ásett, hvat krevst fyri at talan er um brotsroynd ella viðvirkan til brotsverk hjá øðrum.

Ásett verður, at revsiverda gerðin má vera eitt úrslit av eini tilvitaðari gerð ella eitt tilvitað undanlát, og at gerðin má vera framd við neyðugum saknæmi (tilregnelighed).

Tá ið talan er um brot á revsilógina, er kravið, sum høvuðsregla, at brotið er framt tilætlað, meðan brot á revsiásetingarnar í aðrari lóggávu vanliga bert krevja, at brotið er framt av ósketni.

Kravið um saknæmi ber í sær, at gerningsmaðurin skal hava framt gerðina antin við vilja (tilætlað) ella av ósketni í mun til øll lið í gerningsinnihaldinum. Um tilætlan manglar til eitt einstakt lið í gerningsinnihaldinum, eru treytirnar fyri at revsa ikki loknar.

Tað er ikki ein treyt, at gerningsmaðurin visti, at gerðin var revsiverd, tí ókunnleiki um lógina, sleppur ikki gerningsmanninum undan ábyrgd.

Í almenna partinum verður eisini ásett, hvørji sløg av revsing eru, umframt hvørjar aðrar fylgir kunnu ásetast fyri revsiverdu gerðina. Dømi um tílíkar fylgjur er eitt nú, psykiatrisk viðgerð, frádøming av rættindum ella inndráttur av lutum ella peningi. Reglur um revsiáseting, um skerpandi og linnandi umstøður, umframt fyrningarreglur verða somuleiðis ásettar í almenna partinum.

Kapittul 1
Kapittul 1 inniheldur løggildisgrundregluna, sum lógarfestir, at revsing ikki kann áleggjast uttan við heimild í lóg. Hetta skal skiljast soleiðis, at heimildin at revsa formliga skal verða ásett í lóg ella í aðrari almennari rættarreglu, sum t.d. í kunngerð ella í viðtøku, sum er gjørd við heimild í formligari lóg.

Kravið um lógarheimild viðvíkur bæði revsing og øðrum rættarfylgjum av revsiverdu gerðini í kap. 9 í revsilógini. Kravið viðvíkur eisini eitt nú samfelagstænastu í kap. 8, umframt herda revsing og aðrar byrðandi fylgjur av revsirættarligum slagi.

Lóggáva og lógartulking hevur størri týdning í revsirættinum enn t.d. í privatrættinum.

Revsirætturin nýtir tó eisini tær vanliga góðkendu rættarkeldurnar, so sum siðvenja, fordømi, viðurskifti málsins, samtykkireglur o.s.fr. Dómsfordømi hava stóran týdning fyri eitt nú revsiatgerðir og revsiáseting og t.d. fyri, hvat skal skiljast við ósketni og tilætlan.

Løggildisgrundreglan merkir einans, at útgangsstøðið altíð má takast í eini lógaráseting.

Tað sæst í § 2, at kapittul 1 til 11 eru galdandi fyri øll revsiverd viðurskifti, um ikki annað er ásett.

Kapittul 2
Kapittul 2 inniheldur tær vanligu treytirnar fyri at nýta revsirættarligu ásetingarnar.

Innleiðandi ásetingarnar í §§ 3-5 áseta reglur um val av lóg, tá ið tað er munur á rættarstandinum í brotsløtuni, og tá ið brotið skal dømast.

Ásetingarnar í §§ 6-12 innihalda reglur um løgdømi (jurisdiktion), tað vil siga, nær tað eftir umstøðunum er neyðugt ella ynskiligt hjá einum landi at hava revsimyndugleikan.

Galdandi lóg er um danskt løgdømi og danskan revsimyndugleika.

Kapittul 3
Ásetingarnar í kapitli 3 viðvíkja treytunum fyri revsingarbæri. Tað vil siga tær treytir, sum skulu verða loknar, fyri at revsiábyrgd kann áleggjast.

Vanliga verða treytirnar fyri revsingarbæri býtt upp í 4 høvuðsbólkar:
1) Eitt brotgerðarevni skal verða framt
2) við neyðugum saknæmi
3) av einum persóni við fullum skili, og
4) uttan at tað eru serligar umstøður, sum í ítøkiliga førinum, hava við sær, at revsiábyrgd er útilokað.

Kravið um saknæmi ber ikki í sær eitt krav um, at gerningsmaðurin visti, at gerðin (ella undanlátið) var ólógligt, tí ókunnleiki til lógina sleppur einum ikki undan revsiábyrgd.

Hóast ein treyt fyri revsingarbæri er, at gerningsmaðurin er ein persónur, so kann ein løgfrøðiligur persónur í summum førum dømast revsing, um hetta hevur greiða heimild í revsiásetingini.

Kapittul 4
Ásetingarnar í kapitli 4 viðvíkja brotsroynd og viðvirkan. Um treytirnar fyri revsingarbæri eru loknar, er tað ikki bara tann, sum fremur revsiverdu gerðina, sum kann revsast. Um onkur hjálpir til við at fremja gerðina, er hetta eisini revsivert. Hetta verður nevnt viðvirkan.

Um onkur roynir at fremja eina revsiverda gerð, men gerðin miseydnast, kann hetta revsast sum brotsroynd.

Í serliga partinum og í serlóggávu verður ásett, hvat er revsingarbart. Um ikki serligar tulkingarstøður eru, er eitt brotsverk fullgjørt, tá ið, og bert tá ið, tey sermerki, sum ásetingin ásetur, eru til staðar.

Skilt verður ímillum brotsroynd og sjálvboðið at gevast við brotsroynd; tí gevst man sjálvboðin við brotsroyndini, verður hetta ikki revsað.

Kapittul 5
Ásetingarnar í kapitli 5 fevna um løgfrøðiligar persónar.

Grein 23, sum verður roknað sum tann almenna ásetingin um, hvør kann revsast fyri eina revsiverda gerð, fevnir einans um likamligar persónar. Ásetingarnar í kapitli 5 eru sostatt eitt ískoyti til hesa ásetingina.

Kapittul 6
Ásetingarnar í kapitli 6 eru um revsingarnar. Stórur partur av hesum kapitlinum er fluttur í revsifulnaðarlógini (Straffuldbyrdelsesloven), sum kom í gildi 1. juli í 2023.

Kapittul 7
Ásetingarnar í kapitli 7 eru um treytaðan dóm. Treytaður dómur kann ásetast við tí einu fylgistreyt, at tann dømdi ikki ger nakað revsivert í royndartíðini.

Ein treytaður dómur kann eisini áseta aðrar fylgistreytir, sum eru ætlaðar at fyribyrgja kriminaliteti, og sum hava sum endamál at fáa tann dømda aftur á beint t.d. gjøgnum endurútbúgving.

Ásetingarnar um treytaðan dóm geva eisini møguleika at døma treytaða sekt. Hesin møguleiki verður tó ikki nýttur av dómstólunum.

Um treytirnar fyri einum treytaðum dómi ikki verða fylgdar, kann hetta hava við sær, at revsiatgerð verður sett í verk.

Kapittul 8
Ásetingarnar í kapitli 8 viðvíkja samfelagstænastu. Samfelagstænasta er ein revsiatgerð, sum kann verða sett sum fylgistreyt saman við einum treytaðum dómi. Fyri at kunna døma samfelagstænastu, er tað ein fyritreyt, at ákærdi er egnaður til samfelagstænastu, og at ein treytaður dómur ikki verður mettur at vera nóg mikið.

Samfelagstænasta er sostatt ætlað at verða ein valmøguleiki í mun til treytaleysa frælsisrevsing.

Kapittul 9
Ásetingarnar í kapitli 9 eru um aðrar rættarfylgjur av revsiverdu gerðini. Nakrar rættarfylgjur kunnu dømast í staðin fyri revsing – seratgerð og trygdarvarðhald – meðan aðrar verða dømdar saman við revsing – inndrátt og frádøming av rættindum. Nakrar fáar rættarfylgjur kunnu dømast antin saman við revsing ella í staðin fyri revsing, sí § 73.

Kapittul 9 viðger ikki aðrar rættarfylgjur út í æsir.

Kapittul 10
Ásetingarnar í kapitli 10 eru um at áseta revsing. Tá ið metast skal um, hvørt fyritreytirnar fyri revsingarbæri eru loknar, hongur metingin neyvt saman við, hvussu revsiverda gerðin er lýst í revsiásetingini sambært § 1 í revsilógini. Hinvegin hevur rætturin munandi meira frælsi, tá ið tað kemur til val av revsiatgerð og áseting av revsing.

Revsiramman fyri tey ymisku brotsverkini hongur saman við metingini av, hvussu álvarsligt brotsverkið verður mett at vera, heruppií hvussu vandamikið brotsverkið er. Revsiramman avspeglar, hvussu grovt samfelagið metir brotsverkið vera.

Afturat vanligu revsirammuni, sum t.d. kann verða sekt og fongsul í upp til 6 mánaðir, kann koma ein síðurevsiramma, sum gevur møguleika fyri hægri revsing, um umstøðurnar eru serliga skerpandi.

Kapittul 11
Ásetingarnar í kapittul 11 viðvíkja uppathaldi av rættarfylgjum av teirri revsiverdu gerðini. Hetta kann t.d. verða fyrning av revsiábyrgd, fyrning av møguleikanum fyri privatari átalu og til at biðja um almenna átalu, fyrning av dømdari revsing o.a., uppathald av dømdari revsing, tá ið tann dømdi doyr og náðing av inndrátti.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Ætlanin við hesum uppskotinum er at dagføra og føroyska fyrsta partin av revsilógini, sum er almenni parturin. Almenni parturin fevnir um hesar kapitlar:

Kapittul 1: Innleiðandi ásetingar
Kapittul 2: Vanligar treytir fyri at nýta revsirættarligar ásetingar
Kapittul 3: Treytir fyri revsingarbæri
Kapittul 4: Brotsroynd og viðvirkan
Kapittul 5: Revsiábyrgd fyri løgfrøðiligar persónar
Kapittul 6: Revsingarnar
Kapittul 7: Treytað fongsulsrevsing
Kapittul 8: Samfelagstænasta
Kapittul 9: Aðrar rættarfylgjur av revsiverdu gerðini
Kapittul 10: At áseta revsing
Kapittul 11: Uppathald av rættarfylgjum av teirri revsiverdu gerðini

Í lógaruppskotinum eru tað í høvuðsheitum dagføringarnar í mun til galdandi rætt, ið verða gjøllari lýstar. Harumframt verður greitt frá málsligum valum og ivamálum.

Tá ið støða verður tikin til, hvørjar dagføringar skulu gerast í revsilógini, verður hugt at, hvørjar dagføringar eru gjørdar í donsku revsilógini, frá tí at revsirættarliga økið kom undir føroyskt málsræði í 2010. Hugt verður at endamálinum við donsku broytingini, og um tað hevur týdning og verður hildið neyðugt at fremja hesa dagføring í Føroyum.

Av tí at revsilóggávan nú er á føroyskum hondum, verður kapittul 2 umorðaður í samsvar við hesum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

1.4.1. Føroyskur revsimyndugleiki

Í hesum uppskotinum verður danskur revsimyndugleiki broyttur til revsimyndugleiki. Í hesum liggur, at revsimyndugleikin nú er føroyskur.

Tá ið revsirætturin varð yvirtikin í 2010, fekk landsstýrið heimild at áseta reglur um revsimyndugleika.

1.4.2. Treytað revsing við áseting av fongsulsrevsing

Við uppskotinum er ætlanin at strika møguleikan fyri at døma treytaðan dóm uttan at áseta revsing.

Hetta hevur við sær, at ein treytaður dómur frameftir altíð skal hava ásett eina fongsulsrevsing. Hetta er galdandi bæði fyri dómar við og uttan fylgistreytum um samfelagstænastu.

Samstundis er ætlanin eisini at strika møguleikan fyri at døma treytaða sekt.

Í royndum er hetta tað, sum longu verður gjørt, og lógin lagar seg sostatt til veruleikan. Samstundis verður mett, at tað er gott fyri tann dømda at vita, hvør revsingin fyri brotið er, heldur enn at tað verður ásett seinni, um viðkomandi fremur eina nýggja revsiverda gerð.

1.4.3. Samfelagstænasta

Kapittulin viðvíkjandi samfelagstænastu verður við hesum uppskotinum dagførdur við tí endamáli, at samfelagstænasta í enn størri mun skal veljast í staðin fyri treytaleysa fongsulsrevsing.

Endamálið við samfelagstænastu er yvirskipað at avmarka nýtsluna av frælsistøku sum revsing. Hetta kann viðvirka til, at lógbrótarar ikki verða fyri tí neiligu ávirkan, sum kann vera í einum fongsli.

Uppskotið leggur upp til, at samfelagstænasta kann nýtast í sambandi við eina røð av ymiskum brotsverkum. Samstundis skal dentur í minni mun leggjast á slagið av kriminaliteti, tá ið metast skal um, hvørt samfelagstænasta eigur at verða nýtt í ítøkiligum málum.

Víðkað nýtsla av samfelagstænastu eigur serliga at verða umhugsað, tá ið ein persónur fyrstu ferð brýtur lógina.

Samstundis verður skotið upp, at upp til ein triðingur av samfelagstænastuni skal kunna vera luttøka í einum serligum viðgerðar- ella útbúgvingartilboði.

Um hetta skal verða møguligt, er tó neyðugt at føroyska samfelagið kann bjóða hesi tilboð. Kriminalforsorgin hevur ikki tilboðini, men brúkar tey, ið longu finnast í samfelagnum.

Tilboðini viðvíkjandi rúsevnamisnýtslu eru avmarkaði og ambulant viðgerð er nærum ikki tøk í Føroyum. Tað er heldur eingin viðgerð av spælióróg v.
Ymisk tilboð mugu sostatt mennast, um hesi tilboð skulu kunna bjóðast. Samstundis er neyðugt, at tilboðini verða tøk um alt landið, soleiðis at viðgerðin kann vera reglulig og ikki krevur ov langa ferðing.

Ætlanin er annars eisini, at samfelagstænasta kann verða framd hjá privatum vinnuvirkjum.

1.5. Ummæli

Lógaruppskotið varð sent beinleiðis til ummælis hjá hesum pørtum:

Føroya Rætti, Føroya Landfúta, Kriminalforsorgini, Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Advokatfelag, Vinnuhúsinum, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Føroya Kommunufelag, Føroya Politistafelag, Brotsfrøðifelag Føroya, MEGD, Amnesty International Føroyar, KRIS og Etiska Ráðnum.

Lógaruppskotið hevur eisini verið lagt alment fram á hoyringarportalinum hjá landsstýrinum í tíðarskeiðinum.

Ummælistíðin var frá 08. juni til 17. juli 2023.

Í ummælistíðini hava verið hildnir hoyringarfundir við hesar partar:
Føroya Advokatfelag, Etiska Ráðið, Amnesty International Føroyar, MEGD, KRIS og Brotsfrøðifelag Føroya.

Uppskotið hevur eisini verið umrøtt við Revsirættarliga Ráðið. Harumframt eru broytingarnar í kapittul 2 umrøddar við Justitsministeriet og við aðrar serfrøðingar.

Ummæli er komið frá Føroya Rætti, Føroya Landfúta, Umhvørvismálaráðnum, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Vinnuhúsinum, Etiska Ráðnum, MEGD, Amnesty International Føroyar og Brotsfrøðifelag Føroya.

Ummælisskjal er lagt við sum fylgiskjal 3.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað eru ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur av lógaruppskotinum. Broytingarnar viðvíkjandi samfelagstænastu kunnu hava fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Um tilboð um viðgerð og undirvísing skulu veitast, krevur hetta, at føroyska samfelagið kann bjóða hesi tilboð. Kriminalforsorgin hevur ikki tilboðini, men brúkar tey, ið finnast í samfelagnum annars. Um ynski er um tílík tilboð, er sostatt neyðugt at føroyskir myndugleikar menna hesi.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað eru ongar beinleiðis umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur av lógaruppskotinum.
Tað kunnu tó vera umsitingarligar avleiðingar fyri kriminalforsorgina, sum er ein danskur myndugleiki. Hetta kemst av, at ætlanin við lógaruppskotinum er, at samfelagstænasta skal nýtast í fleiri førum í staðin fyri treytaleysa fongsulsrevsing.
Um føroyskir myndugleikar fara undir at menna fleiri tilboð, sí omanfyri, so kann hetta hava umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Uppskotið kann hava við sær, at treytaleysa fongsulsrevsingin verður longri í førum, tá ið ein persónur ger nýggj lógarbrot í royndartíðini, um hann longu hevur ein treytaðan dóm uppá meira enn 3 mðr. fongsul við treyt um samfelagstænastu.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Kapitlarnir um treytaða fongsulsrevsing og samfelagstænastu verða við hesum uppskotinum dagførdir við tí endamáli, at samfelagstænasta í enn størri mun skal veljast í staðin fyri treytaleysa fongsulsrevsing.

Endamálið við samfelagstænastu er yvirskipað at avmarka nýtsluna av frælsistøku sum revsing. Hetta kann viðvirka til, at lógbrótarar ikki verða fyri tí neiligu ávirkan, sum kann vera í einum fongsli.
Skotið verður samstundis upp, at upp til ein triðingur av samfelagstænastuni skal kunna vera luttøka í einum serligum viðgerðar- ella útbúgvingartilboði.

Mett verður at hetta kann hava serliga jaligan virknað í einum lítlum samfelagi sum tí føroyska. Hetta hongur saman við, at tær neiligu avleiðingarnar merkjast betur í einum lítlum samfelagi. Tað er sera týdningarmikið, at so nógvir lógbrótarar sum gjørligt koma aftur á beint og verða virknir samfelagsborgarar.

Hetta krevur tó, at føroyskir myndugleikar menna fleiri tilboð innan eitt nú avvenjing, viðgerð og undirvísing.

Hetta hevur ikki einans týdning í samband við samfelagstænastu, men í líka stóran mun fyri tey tilboð, sum seinni skulu veitast, tá ið vit fáa nýtt fongsul.

Sum heild stuðlar føroyska samfelagið væl undir, at lógbrótarar eiga at fáa møguleika at skapa sær nýtt virkið lív. Hetta sæst eitt nú av, at fleiri privat virki hava tikið seg saman fyri at kunna bjóða innsettum í føroyskum fongslum og fólkum, sum hava sitið dóm, starvsvenjing og arbeiði. Hetta sæst somuleiðis av tí almenna stuðlinum, sum hevur verið til, at eitt nýtt fongsul verður bygt í Føroyum og ynski um, at føroyskir fangar sita dóm í Føroyum.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Fleiri norðurlendskir, evropeiskir og altjóða sáttmálar og avtalur eru galdandi fyri almenna partin av revsilógini. Hetta er serliga galdandi fyri kapittul 2 (§ 1, nr. 4.)

Talan er eitt nú um sáttmálar og avtalur viðvíkjandi útflýggjan av brotsmonnum, rættarsókn, og revsifulnað. Harafturat eru altjóða reglur um lógval, løgdømi og varnarting.

Tað verður mett, at tað ikki er nakað til hindurs fyri at áseta reglur um, at Føroyar kunnu átaka sær revsimyndugleika innan hetta økið.

Í galdandi lóg verður orðingin "den danske stat" nýtt. Hetta hugtakið fevnir eftir galdandi rættarstøðu um Danmark, Føroyar og Grønland. Broytta orðingin í kapittul 2 hevur við sær, at rættarstøðan stórt sæð verður tann sama sum í dag.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Sáttmálin hevur virkað frá 31. august 2005. Sáttmálin skipar Føroyar og Ísland sum eitt búskaparøki, har tað innan fyri innihaldsvídd sáttmálans er bannað at gera mismun vegna tjóðskap, virkisstað ella vegna vøruuppruna.

   Lógaruppskotið er ikki viðkomandi í mun til innihaldið í Hoyvíkssáttmálanum.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar sum lóg tann 1. mai 2000 við Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention.

   Evropeiski Mannarættindasáttmálin hevur til endamáls at verja borgarar í teimum evropeisku londunum ímóti mannarættindabrotum. Sáttmálin varð samtyktur í Evroparáðnum í 1950 við íblástri frá heimsyvirlýsingini hjá ST.

   Við uppskotinum verður kapittulin viðvíkjandi samfelagstænastu dagførdur við tí endamáli, at samfelagstænasta í enn størri mun skal veljast í staðin fyri treytaleysa fongsulsrevsing.

   Endamálið við samfelagstænastu er yvirskipað at avmarka nýtsluna av frælsistøku sum revsing. Hetta kann viðvirka til, at lógbrótarar ikki verða fyri tí neiligu ávirkan, sum kann vera í einum fongsli.

   Tað er í samsvari við mannarættindasáttmálan, at tað í størri mun verður møguligt at avmarkað nýtsluna av frælsistøku sum revsing.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Sáttmálin fekk gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009. Sáttmálin áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.

   Mett verður ikki, at lógaruppskotið gevur fólki við breki betri ella verri rættindini. Støðan má metast at vera óbroytt.

2.9. Markaforðingar

Uppskotið tarnar ikki flytførinum hjá tí einstaka borgaranum ella umstøðunum hjá fyritøkum at virka um landamørk millum Føroyar, Danmark og Grønland. Mett verður tí ikki, at uppskotið hevur markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Í sambandi við broytingarnar í kapittul 7 og 8 (§ 1, nr. 9 og 10) kann uppskotið hava við sær, at treytaleysa fongsulsrevsingin verður longri í førum, tá ið ein persónur ger nýggj lógarbrot í royndartíðini, um hann longu hevur ein treytaðan dóm uppá meira enn 3 mðr. fongsul við treyt um samfelagstænastu. Hinvegin er ætlanin, at samfelagstænasta skal nýtast í størri mun, tá ið ein persónur ger lógarbrot fyrstu ferð, og treytað fongsulsrevsing ikki verður hildin at vera nóg mikið í sjálvum sær.

2.11. Skattir og avgjøld
Tað eru ongar ásetingar um skatt ella avgjøld í lógaruppskotinum.

2.12. Gjøld
Tað eru ásetingar um gjøld í uppskotinum. Ongar broytingar verða tó gjørdar á hesum økinum, og rættarstøðan er sostatt tann sama.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Í § 44 (§ 1, nr. 8) er ein nýggj áseting sett inn. Ásetingin heimilar danska løgmálaráðharranum at áseta nærri reglur um møguleika at kæra avgerðir, sum eru tiknar sambært §§ 40 og 42. Løgmálaráðharrin kann samstundis taka avgerð um, at avgerðirnar ikki kunnu verða lagdar fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Heimildin at skerja kærumøguleikan til hægri fyrisitingarligan myndugleika fevnir um avgerðir tiknar av Direktoratet for Kriminalforsorgen eins og avgerðir hjá kriminalforsorgini í Føroyum.

Løgmálaráðharrin kann eisini áseta nærri reglur fyri kærufreist, kæruviðgerð og steðgandi virknað av kærum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið kann hava umsitingarligar avleiðingar fyri kriminalforsorgina, sum er ein danskur myndugleiki. Hetta kemst av, at ætlanin við lógaruppskotinum er, at samfelagstænasta skal nýtast í fleiri førum í staðin fyri treytaleysa fongsulsrevsing. Hinvegin fer uppskotið ætlandi at hava við sær, at treytaleys fongsulsrevsing verður nýtt í færri førum.

Uppskotið kann samstundis hava við sær, at treytaleysa fongsulsrevsingin verður longri í førum, tá ið ein persónur ger nýggj lógarbrot í royndartíðini, um hann longu hevur ein treytaðan dóm uppá meira enn 3 mðr. fongsul við treyt um samfelagstænastu.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Ætlanin við hesum lógaruppskotinum er í høvuðsheitum at føroyska revsilógina umframt at gera neyðugar dagføringar av lógini.

Í sambandi við at revsilógin verður føroyskað, skal verða gjørt vart við, at tað ikki er ætlanin, at føroyski teksturin innihaldsliga skal víkja frá danska tekstinum. Í teimum førum tá ið føroysk viðurskifti hava gjørt, at onkrar ásetingar í donsku revsilógini ikki eru tiknar við, ella at tað hevur verið neyðugt at gjørt broytingar, er tað **greitt tilskilað í serligu viðmerkingunum.**

Tá ið ein áseting einans er umsett úr donskum til føroyskt, skal føroyska ásetingin innihaldsliga skiljast á sama hátt sum tann danska.

Tí eru einans serligar viðmerkingar gjørdar, tá ið ein broyting er gjørd í mun til tekstin í donsku revsilógini, umframt at greitt verður frá málsligum valum, tá ið málsligir spurningar hava stungið seg upp.

Í almenna partinum av revsilógini verða treytirnar fyri revsingarbæri og revsiatgerðir lýstar. Hesar ásetingarnar eru eisini galdandi fyri revsiásetingarnar í serlóggávuni.

Til nr. 1
Nú almenni parturin er føroyskaður, er øll revsilógin á føroyskum máli. Samstundis eru teir partarnir av lógini, sum hoyra til revsifulnað, sum er danskt málsøki, tiknir út. Skotið verður tí upp at broyta heitið á løgtingslógini til "løgtingslóg um revsing". Stytta heitið verður framvegis "Revsilógin".

Til nr. 2
Heitið á parti I verður broytt til "Almennur partur". Mett verður, at "almennur" er meira hóskandi enn "vanligur", tí ásetingarnar í hesum parti eisini eru galdandi fyri revsiásetingarnar í serlóggávuni.

Til nr. 3
Kapittul 1 verður føroyskaður, t.e. umsettur til føroyskt. Annars eru ongar broytingar gjørdar í hesum kapitlinum.

§ 1
Greinin inniheldur grundregluna um, at revsing má hava heimild í lóg.

Í uppskotinum verður "forhold" umsett til "gerð". Orsøkin er, at einki føroyskt orð er, sum hevur júst sama týdning sum danska orðið "forhold". Danska orðingin "forhold" dekkar breiðari enn "gerð"; tí er ein áseting sett inn í stk. 2, sum staðfestir, at undanlát eisini er fevnt av orðinum "gerð".
Valið av hesi orðing er partvíst grundað á, at man í norsku revsilógini í samsvarandi áseting nýtir orðið "handling" t.v.s. gerð. Á hesum grundarlagi verður mett, at orðið "gerð" kann nýtast.

Ætlanin er ikki at broyta innihaldið í § 1, men talan er um at umseta galdandi grein 1.

§ 2
Ásett verður, at almenni parturin er galdandi fyri øll revsiverd viðurskifti, um ikki annað er ásett.

Til nr. 4
Kapittul 2 ásetir vanligu treytirnar fyri at nýta revsirættarligu ásetingarnar.

§§ 3-5 viðvíkja lógvali, tá ið tað er munur á rættarstøði á brotsgerðarmundinum og dømingarmundinum. §§ 6-12 viðvíkja hinvegin ikki lógval, men áseta tær treytir, sum vanliga gera av, um rættarverjandi myndugleikarnir í Føroyum hava heimild at viðgera eitt revsimál.

§ 3
Rættargangslógin skilur ímillum "påtalemyndighed" og "tiltalemyndighed". Sambært § 722 í rættargangslógini reisir Føroya Landfúti átalu, um ikki annað er ásett. Ákæruvaldi er sambært § 129 í rættargangslógini Ríkisadvokatin, statsadvokatin og Føroya Landfúti, umframt tey sum eru sett at hjálpa hesir undir viðgerðin av revsimálum í rættinum. Tí verður mett rættast at umseta "påtalemyndighed" til "átaluvald" fyri at gera mun á myndugleikunum. Tiltalemyndighed er hinvegin umsett til "ákæruvald".

§ 4
Tilvísingin til § 74 b, sum er í tí donsku revsilógini, er ikki tikin við í lógaruppskotinum. Hetta skyldast, at § 74 b vísir til eina danska lóg um at forða ungdómsbrotsverkum. Eina tílíka lóg hava vit ikki í Føroyum.

§ 6
Í ásetingini er "dansk straffemyndighed" broytt til: "revsimyndugleikin". Hetta er tí, at revsilógin nú er føroysk, og tað tí ikki gevur meining at tosa um danskan revsimyndugleika.

Í uppskotinum verður ásett, at revsimyndugleikin fevnir um gerðir sum eru framdar í tí øki, sum heimarætturin í Føroyum fevnir um, og før, sum eru skrásett í hesum øki. Revsimyndugleikin fevnir sostatt um alt ríkið.

Hetta er eisini tað, sum er lagt til grund í rættargangslógini.

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða sostatt fram.

§ 7
Ásett verður, hvørjar gerðir verða fevndar av revsimyndugleikanum, um ein persónur, sum hevur ávíst tilknýti til øki, sum nevnt í § 6, útinnir ávísar revsiverdar gerðir.

Í ásetingini er "dansk straffemyndighed" broytt til: "revsimyndugleikin" og "den danske stat" er broytt til: "økið sum nevnt í § 6". Í samsvari við rættargangslógina, fevnir revsimyndugleikin sostatt um alt ríkið.

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

§ 7 a
Ásett verður, hvørjar gerðir verða fevndir av revsimyndugleikanum, um revsiverda gerðin er framd á øki hjá fremmandum myndguleika ímóti persóni við ávísum tilknýti til økið, sum er nevnt í § 6.

Í ásetingini er "dansk straffemyndighed" broytt til: "revsimyndugleikin" og "den danske stat" er broytt til: "økið nevnt í § 6". Í samsvari við rættargangslógina fevnir revsimyndugleikin sostatt um alt ríkið.

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

§ 7 b
Ásett verður, at tá ið revsimyndugleikin mótvegis einum løgfrøðiligum persóni er treytaður av tvífaldum revsingarbæri, er tað ikki neyðugt, at lóggávan á brotsgerðarstaðnum heimilar revsiábyrgd fyri ein løgfrøðiligan persón.

Í ásetingini er "dansk straffemyndighed" broytt til: "revsimyndugleikin".

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

§ 8
Greinin ásetir í hvørjum øðrum førum, tað kann vera tørvur á at taka sær revsimyndugleika fyri gerðir, sum verða framdar uttanfyri tað í § 6 nevnda økið, uttan mun til hvar gerningsmaðurin eigur heima.

Í ásetingini er "dansk straffemyndighed" broytt til: "revsimyndugleikin" og "den danske stat" er broytt til: "økið nevnt í § 6". Í samsvari við rættargangslógina, fevnir revsimyndugleikin sostatt um alt ríkið.

nr. 1
Myndugleikarnir, sum eru fevndir av ásetingini, eru eitt nú Løgtingið og landsmyndugleikar, samsvarandi myndugleikar í Grønlandi, ríkismyndugleikar, Fólkating og dómstólar.

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

§ 8 a
Ásetingin viðvíkur gerðum, sum eru framdar uttan fyri tað í § 6 nevnda økið, tá ið tær eru av slíkum slagi, at tær koma undir reglugerðina hjá Millumtjóða revsidómstólinum (eitt nú fólkadráp brotsverk móti mannaættini og krígsbrotsverk), og eru framdar av einum persóni, sum í skuldsetingarløtuni hevur bústað ella fast uppihald í tí í § 6 nevnda øki ella er staddur har.

Í ásetingini er "dansk straffemyndighed" broytt til: "revsimyndugleikin" og "den danske stat" er broytt til "økið nevnt í § 6". Í samsvari við rættargangslógina fevnir revsimyndugleikin sostatt um alt ríkið.

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

§ 8 b
Ásetingin viðvíkur persónum, sum fremja flográn, skipsrán, rán av øðrum samferðslufari ella góðsflytifari ella taka ræði á frálandsvirki, og sum í skuldsetingarløtuni eru búsettir, hava fast uppihald ella eru staddir í tí í § 6 nevnda øki.

Í ásetingini er "dansk straffemyndighed" broytt til: "revsimyndugleikin" og "den danske stat" er broytt til: "økið sum nevnt í § 6". Í samsvari við rættargangslógina fevnir revsimyndugleikin sostatt um alt ríkið.

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

§ 9
Einasta broytingin í ásetingini er, at "den danske stat" er broytt til: "økið nevnt í § 6". Í samsvari við rættargangslógina fevnir revsimyndugleikin sostatt um alt ríkið.

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

§ 9 a
Einasta broytingin í ásetingini er, at "den danske stat" er broytt til: "økið nevnt í §6". Í samsvari við rættargangslógina fevnir revsimyndugleikin sostatt um alt ríkið.

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

§ 10
Ásett verður, at við rættarsókn í Føroyum skal føroysk lóggáva nýtast.

Í ásetingini er "her i landet" broytt til: "Føroyum", og "dansk lovgivning" er broytt til: "føroyskari lóggávu".

Av tí at revsirætturin er føroyskt málsøki, eigur avgerðin um revsing og aðrar rættarfylgjur at verða tikin eftir føroyskari lóggávu.

Eftir galdandi lóggávu skulu avgerðir um revsing og aðrar rættarfylgjur fyri eina gerð takast eftir danskari lóggávu, tá ið gerðin verður rættarsøkt her á landi. Tað er tó lagt til grund, at Føroyar og Grønland eru fevnd at orðingini "danska statinum". Ásetingin útihýsir, at útlendskur revsirættur kann nýtast.

Tað er lagt til grund í viðmerkingunum til galdandi lóggávu, at um onnur lóggáva er galdandi innan fyri ein part av danska statinum, so verður hendan nýtt uppá gerðir, sum eru framdar innan hetta økið, ella á skipum, sum hoyra heima har.

Broytingin er í samsvari við galdandi lóggávu.

Føroya Landfúti og Føroya Rættur hava gjørt vart við, at í einstøkum førum, tá ið ein persónur hevur framt lógarbrot bæði í Føroyum og Danmark, eru málini samlaði á einum staði og avgreidd har eftir ávikavist føroyskari og danskari lóggávu. Tað er ikki avklárað, um tað hevði borið til at nýtt danska lóggávu, sum als ikki var galdandi í Føroyum.

Eftir hesum uppskoti ber framvegis til at døma eitt tílíkt mál í Føroyum, men lóggávan sum skal nýtast, er føroysk lóggáva.

§ 10 a
Í ásetingini er "her i landet" broytt til: "Føroyum", og "Uden for den danske stat" er broytt til: "uttan fyri tað í § 6 nevnda økið". "Danmarks internationale forpligtelser" er broytt til: "millumtjóða skyldum".

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

§ 10 b
Í ásetingini er "her i landet" broytt til: "Føroyum", og "Uden for den danske stat" er broytt til: "uttan fyri tað í § 6 nevnda økið". "Danmarks internationale forpligtelser" er broytt til: "millumtjóða skyldum".

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

§ 11
Ásetingin viðvíkur frádøming ella miss av kalli, vinnu ella øðrum rættindum og er orðað í samsvari við § 6.

Við uppskotinum heldur galdandi rættarstøða fram.

Til nr. 5
Kapittul 3, sum er um treytirnar fyri revsingarbæri, er einans umsett til føroyskt. Ongar innihaldsligar broytingar eru gjørdar.

§ 13, stk. 3
Orðingin "lovlig påbud" er týdd til "lóglig boð".

Orðingin "tvangsanbragt" er týdd til "tvingsilssettur". Orðingin "anbragt" verður vanliga týdd til "heimansettur". Tá ið talan er um tvingsil, kundi hetta verið týdd til "tvingsilsheimansettur" Hetta er tó sera tungt. Tí varð umrøtt við Málráðið, um man møguliga kundi nýta "tvingsilssettur" fyri "tvangsanbragt". Málráðið metir, at tað er í lagi at nýta "tvingsilssettur".

§ 16
Orðingin "utilregnelig" er týdd til: "ósaknæmur". Orðingin hevur verið umrødd við Málráðið, sum sigur, at vanliga verður "utilregnelighed" týdd til "ósaknæmi" og "tilregnelighed" til "saknæmi". Málráðið metir tí, at "utilregnelig" væl kann týðast til "ósaknæmur".

Eftir umrøðu í Revsirættarliga Ráðnum verður orðingin "sindssygdom" týdd til "sinnissjúku". Talan er um eina rættspsykiatriska avgerð og talan er um eitt kliniskt heiti fyri eina serliga revsirættarliga støðu, sum hevur við sær, at persónurin ikki kann revsast.
Tað hevur stóran týdning, at "sinnissjúka" ikki kemur í bland við aðrar sálarligar sjúkur, sum eitt nú "tunglyndi", "ADHD", "angist" o.s.fr.

Orðingin "mentalt retarderet" er týdd til "menningartarn".

§ 19
Orðingin "uagtsomhed" er týdd til "ósketni".

§ 20
Orðingin "uforsætlig følge" er týdd til "ótilætlaða fylgju".

Til nr. 6
Kapittul 4, sum er um brotsroynd og viðvirkan er einans umsett til føroyskt. Ongar innihaldsligar broytingar eru gjørdar.

§ 21
Orðingin "forsøg" verður týdd til "brotsroynd".

Orðingin "navnlig når forsøget vidner om ringe styrke eller fasthed i det forbryderske forsæt" er týdd til "serliga um brotsroyndin ber brá av vantandi styrki ella treysti í brotsligu tilætlanini".

Orðingin "det forbryderske forsæt" er týdd til "brotsligu tilætlanini".

§ 22
Orðingin "fuldbyrdelse" er týdd til "fullgerð". Annars verður "straffefuldbyrdelse" týdd til "revsifulnaður".

§ 23
Orðingin "ved tilskyndelse, råd eller dåd" er í samráð við Málráðið týdd til "við tileggjan, ráði ella verki".

Orðingin "uagtsomhed" er týdd til "ósketni".

Til nr. 7
Kapittul 5, sum er um løgfrøðiligar persónar, er einans umsett til føroyskt. Fyri at tryggja, at rættarstøðan ikki verður broytt, er onkur minni umorðing gjørd í § 26, stk. 1 og § 27, stk. 2. Tað er ikki ætlanin at gera innihaldsligar broytingar við hesum.

§ 26, stk. 1
Orðingin "kommuner og statslige myndigheder" verður broytt til "kommunur, landsmyndugleikar og ríkismyndugleikar". Hetta kemur av, at revsilógin nú verður orðað á føroyskum og soleiðis at ríkismyndugleikar, sum virka í Føroyum, eisini eru nevndir. Ætlanin er ikki við hesum at broyta galdandi rættarstøðu.

§ 27, stk. 2
Orðingin "statslige myndigheder, myndigheder under hjemmestyret og kommuner" verður broytt til "landsmyndugleikar, ríkismyndugleikar og kommunur". Hetta kemur av, at revsilógin nú verður orðað á føroyskum og soleiðis, at ríkismyndugleikar, sum virka í Føroyum, eisini eru nevndir. Ætlanin er ikki við hesum at broyta galdandi rættarstøðu.

Til nr. 8
Í kapittul 6 eru ásetingarnar um revsisløg. Hetta er partur av teimum revsiatgerðum, sum verða lýstar í revsilógini. Afturat revsisløgunum fevna revsiatgerðirnar eisini um treytaða fongsulsrevsing (kap. 7), samfelagstænastu (kap. 8) og serligar rættarfylgjur (kap. 9). Afturat hesum hoyrir eisini afturtøka av átalu, sektarábyrgd, ávaring og frádøming av rættindum.

Tann 1. juli 2023 kom nýggj revsifulnaðarlóg (Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf m.v.) í gildi.

Revsifulnaður er felags málsøki. Nú ásetingarnar um revsifulnað eru fluttar í serstaka lóg, eru í revsilógini bert ásetingar á málsøkjum, sum føroyskir myndugleikar hava ræði á.

§ 31
Orðingin "bøde" verður týdd til "sekt".

§§ 34-36
Skotið verður upp, at ásetingarnar verða strikaðar og fluttar í Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf.

§ 38 og 39
Skotið verður upp at ásetingarnar verða strikaðar og fluttar í Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf.

§ 40
Í § 40 verður stk. 1 verandi, meðan stk. 2-6 verða strikaði og fluttar í Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf.

Orðingin "strafbart forhold" er týdd til "revsiverd viðurskifti". Ætlanin er ikki at gera innihaldsligar broytingar við hesari týðing.

Orðingin "vilkår" er í samráð við Málráðið týdd til "fylgistreytir". Ætlanin er ikki at gera innihaldsligar broytingar við hesari týðing.

§§ 40 a og 41
Ásetingarnar verða strikaðir og fluttar í Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf.

§ 42
Í § 42 verður stk. 1 verandi, meðan stk. 2 verður strikað og flutt í Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf. Samstundis verður ásetingin umorðað, so hon verður lættari at lesa og býtt sundur í tvey stykki. Víst verður eisini til § 79 e í Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf.

Ætlanin er ikki at gera innihaldsligar broytingar í ásetiningini.

§ 43
Skotið verður upp, at ásetingin verður strikað og flutt í Lov for Færøerne og fuldbyrdelse af straf.

§ 44
Ásetingin er nýggj. Við ásetingini verður danska løgmálaráðharranum heimilað at áseta reglur um møguleika at kæra avgerðir, sum eru tiknar sambært §§ 40 og 42. Løgmálaráðharrin kann samstundis taka avgerð um, at avgerðinar ikki kunnu verða lagdar fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Heimildin at skerja kærumøguleikan til hægri fyrisitingarligan myndugleika fevnir um avgerðir, tiknar av Direktoratet for Kriminalforsorgen, eins og avgerðir hjá føroysku kriminalforsorgini.

Ráðharrin kann eisini áseta nærri reglur fyri kærufreist, kæruviðgerð og steðgandi virknað av kærum.

§§ 45-49
Ásetingarnar verða strikaðir og fluttar í Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf.

§ 50
Orðingin "bøde" verður týdd til "sekt".

Orðingin "tillægsstraf" er týdd til "ískoytisrevsing".

§ 51
Av tí at ásetingin er sera long við fáum stykkjum, verður ásetingin býtt sundur í fleiri stykki, fyri at gera ásetingina greiðari og meira lesaravinarliga.

Orðingin "bøde" verður týdd til "sekt".

Ongar innihaldsligar broytingar eru gjørdar í ásetingini.

§ 52
Ásetingarnar verða strikaðar og fluttar í Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf. TAKS er innheintingarmyndugleiki sambært § 91, stk. 2 í Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf.

§ 55
Ásetingin er býtt sundur í fleiri stykki, og uppsetingin av umskiftisrevsingini er broytt tøkniliga. Harafturat er ásetingin broytt soleiðis, at umskiftisrevsingin verður ásett av Føroya Rætti, í staðin fyri býarrættinum í tí rættardømi, har sektaði býr ella hevur uppihald.
Hetta kemst av, at tað í Føroyum einans er ein rættur.

Heitið á rættinum í Føroyum er formiliga "Retten på Færøerne". Dagliga heitið er tó Føroya Rættur, sum verður nýtt her.

Orðingin "forvandlingsstraf" er týdd til "umskiftisrevsing".

Til nr. 9
Ásetingarnar í kapittul 7 viðvíkja treytaðari revsing. Í donsku revsilógini eru ávísar broytingar gjørdar í kapitlinum.

Skotið verður upp, at somu broytingar verða gjørdar í føroysku revsilógini.

Kapitlaheitið
Skotið verður upp at broyta ásetingarnar um treytaðan dóm, so einans fongsulsrevsing kann gerast treytað. Tað vil siga, at sektarrevsing ikki verður treytað.

Sum avleiðing av hesum verður skotið upp at broyta heitið á kapitlinum frá "Betingede domme" til "Treytað fongsulsrevsing", soleiðis at tað sæst beinleiðis á kapitlaheitinum, at kapittulin einans viðvíkur treytaðari fongsulsrevsing.

§ 56
§ 56 er grundásetingin har ásett verður, at ein revsidómur kann gerast treytaður. Skotið verður upp, at stk. 1 verður umorðað, og stk. 2 verður strikað.

Skotið verður upp, at einans fongsulsrevsing kann verða treytað. Tað vil siga, at sektarrevsing ikki kann verða treytað. Hetta sæst av, at orðingin "straf" verður broytt til: "fongsulsrevsing".

Somuleiðis verður skotið upp, at tá ið treytað fongsulsrevsing verður nýtt, skal revsing altíð ásetast. Tað ber í sær, at tað ikki kann í dømast treytað fongsulsrevsing, uttan revsiáseting.

Frameftir fer sostatt ikki at bera til at nýta treytaðan dóm uttan revsiáseting.

Hetta hevur við sær, at í framtíðar málum, har treytaður dómur uttan revsiáseting áður hevur verið nýttur, sum er linasta slag av treytaðari revsing, kann revsing frameftir verða ásett til 7 dagar, sum er stytsta fongsulsrevsing, ið kann dømast sambært § 33 í hesi lóg. Tað eru tó ítøkiligu umstøðurnar í málinum sum avgera, hvussu long ásetta fongsulsrevsingin skal vera.

Tá ið metast skal um, hvørt treytað fongsulsrevsing kann nýtast, eru persónligu viðurskiftini hjá gerningsmanninum, hvat slag av brotsverki talan er um, og hvussu grovt brotsverkið er, partur av ítøkiligu metingini.

Ætlanin er tó, at treytað fongsulsrevsing skal nýtast í størri mun enn í dag, og tí eigur ov stórur dentur ikki at leggjast á slag av brotsverki.

Um ein persónur er undir 18 ár, er størri møguleiki fyri at nýta treytaða fongsulsrevsing, eisini um talan er um at nýta treytaða fongsulsrevsing fleiri ferðir upp í slag. Tað sama er galdandi, um talan annars er um linnandi umstøður, ella tað er langt síðani, at revsiverda gerðin varð framd.

Hinvegin eigur at verða víst afturhaldni, um talan er um meira skipaðan kriminalitet, tvs. tá ið fleiri gerningsmenn meira skipað og tilrættalagt í felag fremja brotsverk. Eisini eigur at verða víst afturhaldni, um talan er um persónsfarligan kriminalitet, tá ið órættaði hevur fingið munandi fysiskan ella sálarligan skaða. Tað sama er galdandi, um brotsverkið er framt móti einum serliga verjuleysum persóni.

Tá ið tað í framtíðini skal veljast ímillum samfelagstænastu og treytaleysa fongsulsrevsing, skal hetta í fyrstu atløgu avgerast út frá eini samlaðari meting av hesum viðskiftum:
1) Lutvíst grovleikin av nú framda brotsverkinum, soleiðis sum sæst á longdini á fongsulsrevsingini, og
2) lutvíst vavið og álvarsemið av áður framdum brotsverkum.

Tá ið rán, neyðtøka, grovur harðskapur, brot á vápnalóggávu undir skerpandi umstøðum, brot á lóggávuna um euforiserandi evni undir serliga skerpandi umstøðum, og hóttanir móti vitnum eru undantikin, eigur høvuðsdentur ikki at verða lagdur á slag av kriminaliteti. Tað eigur tó framvegis at vera víst varsemi, tá ið talan er um meira skipaðan kriminalitet ella í teimum

førum, tá ið órættaði hevur fingið munandi fysiskar ellar sálarligar skaðar. Tað sama er galdandi viðvíkjandi einum serliga verjuleysum persóni.

Ætlanin er ikki, at broytingin skal hava skerpandi virknað við sær, tá ið lógarbrot verða endurtikin eftir ein treytaðan dóm, sum eftir galdandi lóg vildi verið uttan revsiáseting.

Somuleiðis er ætlanin ikki at broyta verandi siðvenju viðvíkjandi áseting av treytum eftir § 57 í revsilógini ella viðvíkjandi áseting av royndartíð.

Tað verður tó við lógaruppskotinum lagt upp til, at tað í størri mun enn í dag kann vera neyðugt at tillaga fylgistreytirnar fyri hvønn einstakan í treytaða dóminum.

Tað verður við uppskotinum somuleiðis lagt upp til, at royndartíðin fyri treytaðar dómar fyri rúsdrekkakoyring og koyring í frádømingartíðini verður ásett á sama hátt sum treytaðir dómar fyri onnur brotsverk.

Verandi stk. 3 verður við lógarbroytingini til stk. 2.

§ 57
Orðingin "tilsyn" er týdd til "umsjón".

Orðingin "prøvetid" er týdd til "royndartíð".

Í nr. 1 verður orðingin "opholdssted" týdd til "uppihaldsstað". Hetta samsvarar við orðingar í Frástøðuboðslógini (Løgtingslóg nr. 25 frá 27. mars 2017 um frástøðuboð, uppihaldsforboð og burturvísing).

Í nr. 4 verður orðingin "afvænningsbehandling" týdd til "avvenjingarviðgerð".

Í nr. 5 verður orðingin "struktureret, kontrolleret alkoholistbehandling" týdd til "skipaða rúsdrekkaviðgerð, sum er undir eftirliti".

§ 59
Í § 59 er stk. 1 strikað í sambandi við at nýggj revsifulnaðarlóg kom í gildi 1. juli 2023.
Stk. 2 og 3 eru framvegis galdandi, men eru nú stk. 1 og 2.

Orðingin "retskendelse" verður týdd til "rættarúrskurð´".

Orðíngin "begæring" verður týdd til "áheitan".

Stk. 2 verður umorðað, av tí at tað bert er ein rættur í Føroyum, sum er Føroya Rættur. Um málið verður lagt fyri ein danskan rætt, eru danskar reglur galdandi.

§ 60
Stk. 1
nr. 2
Í nr. 2 verður tilvísingin til § 56, stk. 3, broytt til stk. 2. Hetta kemst av, at § 56, stk. 2 er strikað við nýggju revsifulnaðarlógini, soleiðis at stk. 3 er blivið til stk. 2.

Orðingin "retskendelse" verður týdd til "rættarúrskurð".

Nr. 3
Sambært broytingini í § 56 verður frameftir ikki møguligt at døma treytaðan dóm uttan áseting av revsing. Hetta hevur við sær, at ásetingin í nr. 3 má umorðast, soleiðis at tað bert kann takast avgerð um, at fongsulsrevsingin skal fullgerast.

Stk. 2
Tilvísingin til § 59, stk. 3 verður broytt til stk. 2. Hetta kemst av, at § 56, stk. 2 er strikað við nýggju revsifulnaðarlógini, soleiðis at stk. 3 er blivið til stk. 2.

§ 61
Orðingin "rettergangsskridt" verður týdd til "rættargangsstig".

Orðingin "forhold" verður her týdd til ávikavist "viðurskifti" og "tilburð". Hetta kemst av, at tað ikki altíð er møguligt málsligt at nýta orðingina "viðurskifti".

Til nr. 10
Kapittul 8 viðvíkur samfelagstænastu. Í kapitlinum verða gjørdar ymiskar broytingar, sum eru ætlaðar at økja um nýtsluna av samfelagstænastu.

Endamálið við samfelagstænastu er yvirskipað at avmarka nýtsluna av frælsistøku sum revsing. Hetta kann viðvirka til, at lógbrótarar ikki verða fyri tí neiligu ávirkan, sum kann fyrikoma í einum fongsli.

Hetta hevur serliga stóran týdning í einum lítlum samfelagi sum tí føroyska.

Uppskotið leggur upp til, at samfelagstænasta kann nýtast í sambandi við eina røð av ymiskum brotsverkum. Samstundis skal dentur í minni mun leggjast á slag av kriminaliteti, tá ið metast skal um, hvørt samfelagstænasta eigur at verða nýtt í ítøkiligum málum.

Víðkað nýtsla av samfelagstænastu eigur serliga at verða umhugsað, tá ið ein persónur fyrstu ferð brýtur lógina, tó ikki um talan er um skipaðan kriminalitet ella bandakriminalitet.

Samstundis verður skotið upp, at upp til ein triðingur av samfelagstænastuni skal kunna vera luttøka í einum serligum viðgerðar- ella útbúgvingartilboði.

§ 62
Í § 62 verður ásett, at treytað fongsulsrevsing kann dømast við treyt um samfelagstænastu.
Ongar broytingar eru ætlaðar í stk. 1, sum ásetur, at samfelagstænasta kann dømast, um treytaður dómur verður hildin at vera ónøktandi, og ákærdi verður mettur at vera egnaður til tess.

Broytingin í stk. 2 hongur saman við broytingini í § 56, stk 1, har ætlanin er, at revsing altíð skal ásetast, tá ið treytað fongsulsrevsing verður ásett.

§ 63
Stk. 1
Í § 63, stk. 1 verða høvuðstreytirnar fyri samfelagstænanstu ásettar. Hetta hevur við sær, at tann dømdi skal gera ólønta samfelagstænastu í minsta lagi 30 og í mesta lagi 300 tímar.

Samfelagstænastan skal verða útint innan fyri eina mestutíð, sum verður ásett í mun til tímatalið.
Tímatalið verður við uppskotinum hækkað úr 240 tímum til 300 tímar. Ætlanin við broytingini er at víðka møguleikan fyri samfelagstænastu í teimum førum, har tað annars hevði verið dømd treytaleys fongsulsrevsing í meira enn 1 ár og 6 mánaðir, men ikki meira enn 2 ár.

Skotið verður upp, at samfelagstænasta afturat óløntum arbeiði eisini skal kunna útinnast við, at tann dømdi luttekur í einum viðgerðartilboði ella einum útbúgvingartilboði, sum kriminalforsorgin tekur avgerð um.

Á hesum grundarlagi verður skotið upp at broyta "arbeiðsskyldan" til "samfelagstænastan". Samfelagstænastan skal útinnast innan fyri eina mestutíð, sum verður ásett í mun til "tímatalið" ikki "arbeiðstímatalið".

Ætlanin er ikki at gera broytingar í ásetingini av tímatalinum fyri samfelagstænastu ella mestutíðini fyri útinningini av samfelagstænastuni. Tað verður tó lagt upp til, at Føroya Rættur, tá ið hann ásetur tímatalið og mestutíðina, skal taka støði í niðanfyristandandi vegleiðandi umrokningartabell.

Fongsulsrevsing	**Samfelagstænasta**	**Mestatíð**
7-14 dagar	30 tímar	4 mánaðir
20-30 dagar	40 tímar	4 mánaðir
40-50 dagar	60 tímar	6 mánaðir
60 dagar – 3 mánaðir	80 tímar	6 mánaðir
4-5 mánaðir	100 tímar	8 mánaðir
6-7 mánaðir	120 tímar	8 mánaðir
8-11 mánaðir	150 tímar	1 ár
1 ár - 1 ár og 5 mánaðir	200 tímar	1 ár
1 ár og 6 mánaðir - 1 ár og 11 mánaðir	250 tímar	1 ár og 6 mánaðir
2 ár	300 tímar	1 ár og 6 mánaðir

Ætlanin er, at Føroya Rættur í ítøkiliga málinum fyrst ásetir longdina á fongsulsrevsingini í samsvari við vanligu reglurnar í kapitli 10. Síðan er ætlanin, at rætturin sum meginregla ásetir tímatalið, soleiðis sum ásett er í umrokningartabellini.

Um talan er um ein samansettan dóm, er ætlanin, at umrokningartabellin skal nýtast til treytaða partin av fongsulsrevsingini, tvs. at um fongsulsrevsingin er sett til 1 ár og 6 mánaðir, har 2 mánaðir er treytaleys revsing og 1 ár og 4 mánaðir er treytað revsing við treyt um samfelagstænastu, er ætlanin, at tímatalið fyri samfelagstænastu sum meginregla verður sett til 200 tímar.

Umrokningartabellin er vegleiðandi og víkjast kann frá henni, um serlig vælgrundaði atlit eru. Tað verður í hesum sambandi lagt til grund, at tað nágreiniliga verður tilskilað í dómsgrundunum, hví rætturin hevur vikið frá umrokningartabellini, umframt at grundgivið verður fyri hesum.

Ætlanin er, at treytaða fongsulsrevsingin skal metast at samsvara við samlaðu treytirnar, sum eru ásettar, soleiðis at um dómurin, umframt samfelagstænastuna, áleggur dømda fleiri

tyngjandi treytir, so eigur talið av samfelagstænastutímum at setast lægri enn vanligt. Serliga tyngjandi treytir kann eitt nú verða treyt um viðgerð.

Skerpandi umstøður, sum t.d. endurtiknar brotsgerðir, kunnu eftir vanligu reglunum um revsiáseting hava týdning, tá ið longdin av fongsulsrevsingini skal ásetast. Hetta talar fyri, at tað í tílíkum málum eisini kann ásetast fleiri samfelagstænastutímar í málum, har tað eru skerpandi umstøður. Hinvegin eiga skerpandi umstøður ikki at hava við sær frávik frá vegleiðandi umrokningartabellini, tí at skerpandi umstøður eiga ikki at hava við sær, at ásett verður eitt hægri tímatal av samfelagstænastu sæð í mun til longdina á treytaða dóminum. Somuleiðis eiga linnandi umstøður ikki at hava við sær eitt lægri tímatal av samfelagstænastu sæð í mun til longdina á treytaða dómin. Skerpandi og linnandi umstøður eiga í staðin at hava týdning fyri

- áseting av longdini á fongsulsrevsing,
- valið millum treytaða ella treytaleysa fongsulsrevsing
- valið millum heilt treytaðan og partvíst treytaðan dóm (samansettur dómur) ella
- millum treytaðan dóm við og uttan treyt um samfelagstænastu.

Tað kann verða orsøk til at víkja frá vegleiðandi umrokningartabellini niðureftir, um fongsulsrevsingin er ein samlað revsing fyri fleiri ymiskar gerðir, har ein týðandi partur kemur frá gerðum, sum í sær sjálvum einans høvdu verið revsaðar við treytaðum fongsli uttan treyt um samfelagstænastu.

Dømi um hetta er ein persónur, sum verður dømdur 4 mánaðir fongsul fyri ríkingarbrotsverk (berigelsesforbrydelse) og harðskap. Ríkingarbrotsverkið hevði í sær sjálvum verið revsað við 3 mánaðum treytaðum fongsli uttan treyt um samfelagstænastu. Harðskapurin hevði í sær sjálvum verið revsaður við 40 daga treytaðum fongsli við treyt um samfelagstænastu. Í tílíkum førum eigur frávik at gerast frá tabellini. Í tílíkari støðu kundi talið av tímum til samfelagstænastu hóskandi verið ásett til 60 tímar, sum samsvarar við 40 daga fongsul.

Í torgreiddum málum við fleiri ymiskum gerðum má ein ítøkilig meting gerast av, um og í hvønn mun tað eigur at víkjast frá umrokningartabellin.

Tabellin sigur eisini nakað um, hvør mestatíð vanliga eigur at ásetast fyri at útinna eitt givið tímatal av samfelagstænastu. Tá ið vikið er frá útgangsstøðið viðvíkjandi tímatali av samfelagstænastu, eigur umrokningartabellin sum meginregla at nýtast.

Tað sama er galdandi fyri mestutíð sum er fyri samfelagstænastu. Um støðið verður tikið í døminum omanfyri, so eigur mestatíðin at roknast út frá teimum ásettu 60 tímunum, tvs. at mestatíðin verður 6 mánaðir, og ikki 8 mánaðir, sum ein dómur uppá 4 mánaða fongsul annars hevði lagt upp til.

Sum við samfelagstænastu eigur tað at nágreinast og grundgevast fyri, hví vikið verður frá tabellini viðvíkjandi mestutíð.

Dømi um umstøður, sum tala fyri at víkja frá meginregluni um mestatíð uppeftir, er um dømdi skal í eina longri viðgerðartilgongd (eitt nú skurðviðgerð við endurvenjing) ella stendur at skula eiga ella sita treytaleysa partin av samansettum dómi (hetta er ikki galdandi, um tann treytaleysi parturin samsvarar við varðhaldsfongsling áðrenn dómin).

Frávik frá mestutíð uppeftir vil verða serliga viðkomandi fyri tær styttru mestutíðirnar, og í hvussu er ikki um talan er um mestutíðir yvir 1 ár. Mestatíðin kann ásetast til annað enn talið av mánaðum, sum er ásett í tabellini, t.d. 5 mánaðir.

Dømi um umstøður sum tala fyri at víkja frá niðureftir er, um dømdi hevur sitið varðhaldsfongslaður áðrenn dómin, soleiðis at tað eigur at styttast í dømdu samfelagstænastuni.

Orðingin "længstetid" verður týdd til "mestutíð".

Stk. 3
Ásetingin viðvíkur áseting av royndartíð í sambandi við dóm viðvíkjandi samfelagstænastu.

Skotið verður upp at broyta 2. pkt. soleiðis, at tað verður ásett, at um treytaða fongsulsrevsingin er ásett at vera í mesta lagi 3 mánaðir, heldur royndartíðin uppat, tá ið mestatíðin at gera samfelagstænastu er runnin.

Hetta hevur við sær, at um dømda treytaða revsingin er minni enn 3 mánaðir, so endar royndartíðin altíð, tá ið mestatíðin fyri at útinna samfelagstænasta endar. Um dømda treytaða revsingin er meira enn 3 mánaðir, verður royndartíðin ongantíð ávirkað av, nær mestatíðin fyri at útinna samfelagstænastuna endar. Hetta fer frameftir at fylgja beinleiðis av lógini, og avgerð skal ikki takast um hetta í dóminum. Hetta hevur eisini við sær, at tað altíð verður ein royndartíð, sum endar, aftan á at mestatíðin fyri samfelagstænastu er endað. Bert í førum tá ið mestatíðin fyrisitingarliga er longd, so hon svarar til royndartíðina, ella í undantaksføri tá ið tað í dóminum er ásett sama longd av tíð fyri mestutíð og royndartíð, kann royndartíðin fyri longri enn 3 mánaða treytað fongsul, enda samstundis sum mestatíðin.

Um talan er um samansettan dóm, er § 63, stk. 2, 2. pkt. galdandi fyri treytaða partin av fongsulsrevsingini.

Stk. 4
Ásetingin viðvíkur umsjón og øðrum treytum enn treyt um samfelagstænastu.

Skotið verður upp, at "arbeiðsskyldan" verður broytt til: "samfelagstænastan". Sí annars viðmerkingar til stk. 3.

§ 64
Ásetingin heimilar, at tað í sambandi við treytaðan dóm við treyt um samfelagstænastu, kann verða dømd treytaleys fongsulsrevsing ella sekt eftir reglunum í § 58.

Galdandi lóg ásetir tó, at treytaleys fongsulsrevsing, sum verður dømd í sambandi við treytaðan dóm við treyt um samfelagstænastu, ikki kann vera longri enn 3 mánaðir.

Skotið verður upp at seta inn eina avmarking afturat í sambandi við longdina av treytaleysari fongsulsrevsing, soleiðis at treytaleysa fongsulsrevsingin harafturat ikki kann vera longri enn ein triðing av samlaðu fongsulsrevsingini.

Hetta kann hava týdning í mun til samansettar dómar, har samlaða fongsulsrevsingin er sett til minni enn 9 mánaðir.

§ 65
Orðingin "vilkår" verður týdd til "fylgistreytir".

§ 66
stk. 3.
Skotið verður upp at broyta 2. pkt. soleiðis, at tað verður ásett, at um tann dømda treytaða fongsulsrevingin er ásett at vera longri enn 3 mánaðir, so verður dømda samfelagstænastan mett at svara til tveir triðingar av treytaðu fongsulsrevsingini.

Eftir galdandi áseting samsvaraði samfelagstænastan við treytaðu fongsulsrevsingina. Ætlanin við uppskotinum er at skerpa virknaðin av einum dómi viðvíkjandi samfelagstænastu, soleiðis at dømda samfelagstænastan einans svarar til tveir triðingar av treytaðu fongsulsrevsingini.

Ásetingin hevur eisini týdning í mun til brot á aðrar treytir enn samfelagstænastu, men eisini í mun til um nýggj brotsverk, ið verða framd í royndartíðini, sí eitt nú § 67 í revsilógini. Hetta fylgir millum annað av, at § 67, stk. 3 vísir til § 66, stk. 3.

Sum meginregla kann útrokning av írestandi revsing roknast soleiðis, um tann dømdi brýtur treytina um samfelagstænastu eftir at hava útint part av dømda tímatalinum:

Írestandi revsing (í døgum) = Dømd treytað fongsulsrevsing (í døgum) – Útint samfelagtænasta (í tímum) / Dømd samfelagstænasta (í tímum) x Dømt treytað fongsul (í døgum) (x 2/3)

2/3 skal bert takast við, um dømda treytaða fongsulsrevsingin er longri enn 3 mánaðir.

§ 67
stk. 2.
Ásetingin viðvíkur føri tá ið ein persónur, sum eftir ein treytaðan dóm við treyt um samfelagstænastu, verður skuldsettur fyri revsiverd viðurskifti, sum hann hevur framt fyri ella eftir dómin.

Einasta broyting, sum verður gjørd í ásetingini, er, at frælsisrevsing verður broytt til fongsulsrevsing. Hetta hongur saman við, at hefti, sum revsing, var avtikin í 2001. Tað er tí bert ein frælsisrevsing, og tað er fongsul.

Til nr. 11
§ 68
Orðingin "foranstaltning" verður týdd til "fyriskipan"

Orðingin "tilsyn" verður týdd til "umsjón.

Orðingin "opholdsted" verður týdd til "uppihaldsstað". Hetta samsvarar við hvussu hetta er orðað í Frástøðuboðslógini (Løgtingslóg nr. 25 frá 27. mars 2017 um frástøðuboð, uppihaldsforboð og burturvísing).

Orðingin "vidtgående psykiske handicap" er týdd til "víðfevnandi sálarlig brek".

§ 68 a
Orðingin "længstetid" verður týdd til "mestatíð".

Orðingin “kendelse” verður týdd til “úrskurð”.

Orðingin “ophæve” verður týdd til “úrgilda”.

§ 69
Orðingin “mangelfuld udvikling, svækkelse eller forstyrrelse af de psykiske funktioner” verður týdd til “ vantandi menning, viknan ella ólag í sálarliga virkisførinum”.

§ 70
Orðingin “forvaring” er í samráð við Málráðið týdd til “trygdarvarðhald”.

Orðingin “karakteren af det begåede forhold” er týdd til “sermerkinum á framda tilburðinum”

Orðingin “forhold” er í hesari áseting týdd til “tilburð”, hetta kemst av, at hetta riggar best í hesum samanhanginum.

§ 71
Ásetingin viðvíkur møguleikanum hjá rættinum at tilnevna ein stuðulsverja, tá ið ein ákærdur kann verða dømdur at verða settur á stovn ella í trygdarvarðhald eftir reglunum í §§ 68 – 70.

Stuðulsverjin skal vera tí ákærda til hjálpar og skal helst vera ein av nærmastu avvarðandi hjá ákærda. Tað eru ongi krøv um útbúgving fyri at verða tilnevndur sum stuðulsverji.

“Stuðulsverji er føroyska orðið fyri “bistandsværge”. Í Føroyum verður advokaturin hjá ákærda nevndur “verji”, sum samsvarar við danska orðið: “forsvarer”. Samstundis er føroyska orðið fyri “værge” eisini “verji”. Fyri at bland ikki skal koma í hugtøkini, verður “bistandsværgen” tí nevndur “stuðulsverji”. Orðingin “stuðul” er vald, tí uppgávan hjá “stuðulsverjanum” er at stuðla tí ákærda undir rættarmálinum og um viðkomandi verður dømdur at sita á stovni ella í trygdarvarðhaldi at tryggja, at uppihaldið og aðrar fyriskipanir ikki vara longur enn neyðugt.

Tað eru ongar innihaldsligar broytingar gjørdar í tekstinum.

§ 72, stk 3
Av tí at § 59, stk. 1 er strikað í sambandi við nýggja revsifulnaðarlóg, og stk. 2 og 3 tí eru broytt til stk. 1 og 2, verður tilvísingin til § 59, stk. 3 broytt til: “stk. 2”.

§ 73 a
Tá ið orðingin “løgmálaráðharri” verður nýtt í ásetingini, meinast við danski løgmálaráðharrin. Av tí at talan er um revsifulnað, er tað danska løgmálaráðharran, sum ásettir nærri reglur og ikki landsstýrismaðurin í lógarmálum.

Tað er ógreitt, um tað er landsstýrismaðurin í almannamálum (sum hevur ábyrgd av Almannaverkinum) ella landsstýrismaðurin í barna- og undirvísingarmálum (sum hevur ábyrgd av barnaverndini) sum umsitur omanfyri nevnda økið, og tað er tí ásett, at danski løgmálaráðharrin í samráð við landsstýrið kann áseta nærri reglur um at geva útgonguloyvi. Um neyðugt verður at áseta reglur, má støða takast til, hvat øki talan er um.

§ 74 a
Tá ið orðingin “løgmálaráðharri” verður nýtt í ásetingini, meinast við danski løgmálaráðharrin.

Av tí at talan er um revsifulnað, er tað danski løgmálaráðharrin, sum ásettir nærri reglur og ikki landsstýrismaðurin í lógarmálum.

Tað er ógreitt, um tað er landsstýrismaðurin í almannamálum (sum hevur ábyrgd av Almannaverkinum) ella landsstýrismaðurin í barna- og undirvísingarmálum (sum hevur ábyrgd av barnaverndini) sum umsitir omanfyri nevnda økið, og tað er tí ásett, at danski løgmálaráðharrin í samráð við landsstýrið kann áseta nærri reglur um at geva útgonguloyvi. Um neyðugt verður at áseta reglur, má støða takast til, hvat øki talan er um.

Orðingin "struktureret, kontrolleret socialpædagogisk behandling" er týdd til "skipaða sosialpedagogiska viðgerð, sum er undir eftirliti".

Orðingin "sikret afdeling" verður týdd til "trygdardeild".

§ 75
Orðingin "udbytte" er her týdd til "úrtøka".

Orðingin "genstande" er týdd til "lutir".

Orðingin "erhververen" er týdd til "ognarin"

§ 76 a
Orðingin "formuegode" er týdd til "ognarlutur" meðan "formuegoder" er týdd til "ognir".
d
Orðingin "samlivsforhold" er týdd til "fastasamlív".

§ 77 a
Orðingin "befrygte" er týdd til "stúra".

Orðingin "beskaffenhed" er týdd til "vegna slag".

§ 78, stk 3
Av tí at § 59, stk. 1 er strikað í sambandi við nýggja revsifulnaðarlóg, og stk. 2 og 3 tí eru broytt til stk. 1 og 2, verður tilvísingin til § 59, stk. 3 broytt til: "stk. 2".

Til nr. 12
§ 80
Orðingin "retsanvendelse" er týdd til "rættarreglunýtslu".

Orðingin "krænkelse" er týdd til "skemd".

§ 81
Orðingin "ytringer" er týdd til "framsøgn".

Orðingin "letsind" er týdd til "gáloysni".

§ 82
Orðingin "oprørt sindstilstand" er týdd til "sinnismun".
§ 86

Stk. 1
Orðingin “mentalundersøgelse” er týdd til “sálarkanning”.

Stk. 6
Orðingin “anke” er týdd til “dómsskot”.

Stk. 8
Ásetingin hevur ásetingar um, at handtøka, varðhaldfongsling og innlegging í sambandi við sálarkanningar skal styttast í dømdari fongsulsrevsing og sekt.

Av tí at greinin er sera long, við fleiri longum stykkjum, verður skotið upp at býta greinina upp í fleiri styttri stykki. Hetta ger ásetingina meira lesivinarliga.

Sum nakað nýtt verður skotið upp, at tað skal kunna styttast í dømdari samfelagstænastu. Eins og við stytting í treytaleysari fongsulsrevsing er tað kriminalforsorgin, sum ger styttingina.

Skotið verður upp, at stytting skal gerast lutfalsliga í dømda tímatalinum á samfelagstænastu. Styttingin skal gerast við sama lutfalli í dømda talinum av samfelagstænastu, sum handtøka, varðhaldfongsling og innlegging í sambandi við sálarkanningar, verður stytt í dømdari treytaðari fongsulsrevsing.

Dømi: 60 daga treytað fongsul við treyt um 80 tímar samfelagstænastu. Samlaða talið av døgum, sum eftir § 86, stk. 1-3 verður stytt, er 20 dagar. Tá ið dómurin skal fullgerast, verður styttur ein triðingur av dømdu samfelagstænastuni, tvs. 27 tímar (avrundað). Dømdi skal tí einans útinna 53 tímar av samfelagstænastu.

Um talan er um samansettan dóm, verður skotið upp, at tað fyrst verður gjørd stytting í samfelagstænastuni aftaná, at stytting er gjørd í treytaleysa partinum av revsingini sambært § 86, stk. 7 (orðingin er ikki broytt). Sostatt verður stytting gjørd í treytaleysa partinum av einum samansettum dómi, um ikki annað verður avgjørt í dóminum. Um lutfalslig stytting verður gjørd í samfelagstænastuni, verður hetta gjørt í treytaða partinum av fongsulsrevsingini.

Um rætturin eftir § 86, stk. 5 avger, at at øll revsingin er at rokna sum sitin, hóast dømda revsingin er longri enn tíðin, sum tann dømdi hevur verið frælsisskerdur ella innlagdur, skal tað somuleiðis gerast full stytting í dømdu samfelagstænastuni, og dømdi fer tí als ikki at útinna nakra samfelagstænastu. Vanliga vil tað vera óhóskandi, at dømdi skal útinna eitt sera lágt tal av tímum av samfelagstænastu. Í teimum førum, tá ið dømdi skal útinna minni enn 20 tímar av samfelagstænastu, er góð grund til at nýta § 86, stk. 5 í revsilógini.

Um dømdi brýtur treytina um samfelagstænastu, møguligar serligar treytir ella ger nýggj lógarbrot í royndartíðini, skal tað við áseting av revsing takast atlit at, hvussu nógv samfelagstænasta er útint, samanber við § 66, stk. 3 og § 67, stk. 3 og viðmerking til § 1, nr. 10.

Sum meginregla kann útrokning av írestandi revsing roknast soleiðis, um tann dømdi brýtur treytina um samfelagstænastu eftir at hava útint part av dømda tímatalinum:

Írestandi revsing (í døgum) = Dømd treytað fongsulsrevsing (í døgum) – Útint samfelagtænasta (í tímum) / Dømd samfelagstænasta (í tímum) x Dømt treytað fongsul (í døgum) (x 2/3) – frádrátt fyri varðhaldsfongsling (í døgum).

2/3 skal bert takast við, um dømda treytaða fongsulsrevsingin er longri enn 3 mánaðir.

Stk. 9
Ásetingin er ikki nýggj, men víst verður eisini til nýggja stk. 8. Harumframt verður víst til § 66, stk. 1, nr. 1. Hetta hevur við sær, at stytting í dømda tímatalinum av samfelagstænastu eisini kann gerast í sambandi við samansettar dómar eftir § 66, stk. 1, nr. 1, um tann dømdi hevur brotið aðrar treytir, enn treytina um órevsiverdan levnað.

Til nr. 13
§ 93 b
Stk. 2
Fyrningarfreistin fyri kynsligan ágang verður ikki strikað við hesum uppskoti. Tá ið broytingar vóru gjørdar í kapitlinum um kynslig brotsverk í 2017 (Løgtingslóg nr. 84 frá 29. mai 2017 um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven), varð fyrningarfreistin longd munandi. Samstundis varð avgjørt eftir samrøður við ymiskar felagsskapir og politiið, at tað var skilabest ikki heilt at avtaka fyrningarfreistina.

Grundgevingin fyri hesa avgerð var, at rættarmál viðvíkjandi kynsligum brotsverkum í stóran mun eru grundaði á vitnisfrásagnir, og at tað sjáldan eru teknisk prógv. Prógvbyrðan kann tí verða torfør at lyfta, um ikki tað eru vitnisfrásagnir sum undirbyggja ákæruna, ella tað eru teknisk prógv.

Longri tíð gongur áðrenn eitt mál verður meldað, verri verður tað eisini fyri ákæruvaldið at lyfta prógvbyrðuna.

Hetta er ein trupulleiki bæði fyri tann, sum verður ákærdur fyri kynslig brotsverk, og fyri órættaða. Tann, sum verður ákærdur, fær trupult at verja seg, og órættaði fær trupult við at prógva tilburðin. Hetta ger tað sjálvsagt eisini trupult hjá løgregluni at finna prógv, sum kunnu halda í rættinum, og sostatt verða tað verri útlit at fáa dóm í einum máli, longri tíð gongur, áðrenn tilburðurin verður meldaður.

Um fyrningarfreistin verður strikað, er vandi fyri, at mál verða meldað upp aftur seinni við tí úrsliti, at tað ikki er møguligt at lyfta prógvbyrðuna.

§ 94
Av tí at ásetingarnar í greinini vóru sera langar og tí torførar at lesa, er greinin býtt upp í fleiri stykki. Hetta hevur við sær, at fleiri stykki eru í greinini, og at ásetingar flyta pláss.

Stk. 4
Skotið verður upp at býta stk. 4 upp í trý stykki fyri at gera ásetingina greiðari og meira lesivinarliga.

Ásetingarnar um fosturtøku, fosturfækkan ella sterilisering uttan samtykki móti persóni undir 18 ár verða tí fluttar í stk. 5.

Ásetingin, sum viðvíkur at tvinga tann órættaða til ikki at melda eina revsiverda gerð, verður til stk. 6.

Stk. 7
Ásetingin, sum er um at slíta fyrningarfreistina, og sum í galdandi lóg er stk. 5, verður flutt til stk. 7, vegna broytingarnar í stk. 4. Samstundis verður tilvísingin til rættargangslógina broytt, so hon samsvarar við galdandi rættargangslóg.

Orðingin "forkyndelse" verður týdd til "kunnuggering" og "forkynde" verður týdd til kunnuggera.

Stk. 8
Nú greinin er býtt upp í fleiri stykki, er stk. 8 seinasta ásetingin í § 94.

Til nr. 14
§ 124, stk. 2 og 3.
Løgmálaráðið hevur umrøtt orðingina "tvangsanbragt" við Málráðið í samband við at § 13 verður týdd. Málráðið metti at "tvingsilssettur" var eitt gott orð fyri "tvangsanbragt". Orðingin í § 124, stk. 2 og 3 verður tí broytt samsvarandi.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Løgmálaráðið, 20. september 2023

Bjarni Kárason Petersen
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Orðalisti
Fylgiskjal 3: Ummælisskjal
Fylgiskjal 4: Ummælisskriv frá sorinskrivaranum
Fylgiskjal 5: Ummælisskriv frá Føroya Landfúta
Fylgiskjal 6: Ummælisskriv frá Vinnuhúsinum
Fylgiskjal 7: Ummælisskriv frá Almanna- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 8: Ummælisskriv frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 9: Ummælisskriv frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 10: Ummælisskriv frá Uttanríkis – og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 11: Ummælisskriv frá Umhvørvismálaráðnum
Fylgiskjal 12: Ummælisskriv frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum
Fylgiskjal 13: Ummælisskriv frá Brotsfrøðifelag Føroya
Fylgiskjal 14: Ummælisskriv frá MEGD
Fylgiskjal 15: Ummælisskriv frá Amnesty Føroyar
Fylgiskjal 16: Ummælisskriv frá Etiska Ráðnum